

ATLANTIC AIRWAYS

# Konsern- og ársfrásøgn 2019

www.atlantic.fo

# 1.1 Partafelagsupplýsingar

## P/F Atlantic Airways, Faroe Islands

Vágar Airport
FO-380 Sørvágur
Faroe Islands
Tel + 298 34 10 00
Fax +298 34 10 01
Stovnað 1987
Skrásetingar nr. 1223
V-tal 379778

Heimstaðarkommuna: Sørvágur
Heimasíða felagsins: www.atlantic.fo
Teldupostur: administration@atlantic.fo

## Nevnd

Niels Mortensen, *formaður*
Kaj Johannessen, *næstformaður*
Laila Hentze
Fróði Magnussen
Eystein í Løðu
Johan Vágadal

## Stjórn

Jóhanna á Bergi, *forstjóri*
Marius Davidsen, *fíggjarstjóri*

## Grannskoðan

P/F Januar, *løggilt grannskoðanarvirki*

## Dótturfelag

P/F Hotel Atlantic

## Assosierað feløg

P/F Duty Free
P/F Greengate
P/F Gjáargarður
P/F Ognarfelagið matr. nr. 1332e

# 1.2 Atlantic Airways í stuttum

## Okkara uppruni og stevnumið

Atlantic Airways varð stovnað til tess at menna føroyska flogvinnu og flogferðslu og á tann hátt leggja lunnar undir eitt professionelt flogvinnuumhvørvi í Føroyum.

Síðan felagið varð sett á stovn í 1987, hevur tað ment seg frá at vera eitt lítið felag við einum flogfari og avmarkaðum førleikum til eitt felag, sum rekur fleiri flogfør og tyrlur. Starvsfólkaliðið telur í dag 195 ársverk, og við árslok í 2019 vóru flogførini trý og tyrlurnar tvær í tali.

Atlantic Airways hevur sum sítt fremsta mál at knýta Føroyar at umheiminum og fyri at knýta oyggjarnar saman og skapa tryggleika. Flogið verður fyri Føroyar við einum regluligum, smidligum og fjølbroyttum rutuneti og við tænastum við kappingarførum prísum. Felagið flýgur við framkomnari tøkni og útgerð og nýtir nútímans samskifti. Kundin er í miðdeplinum. Samskapað verður við kundar og samfelag um tænastur og upplivingar.

Hjá Atlantic Airways er trygdin í hásæti, stundvísi eitt mál, kundin í miðdeplinum, starvsfólkini dugnalig og tænastusinnað og úrslitini skapa virði. Virkisøkið felagsins er rutuflúgving og tyrlutænastur við Føroyum sum hornasteini og leiguflúgving við tøkari orku. Harumframt verða handilsøki ment úr kjarnuførleikum felagsins og luttikið verður í menning av ferðavinnu, farmaflutningi og øðrum flutningsuppgávum.

Rutuflúgvingin er býtt sundur í Danmarkar-, NORÐ- og SÓL-leiðir, umframt nýggja farleið til París og ætlandi eisini New York. Talið á lágprísferðaseðlum er økt munandi, bæði til Danmarkar og á NORÐ-leiðunum. Við NORÐ-leiðunum er flogsambandið millum Føroyar og grannalondini, Ísland, Noreg og Skotland, bøtt munandi. Tyrlutilbúgving og rutuflúgving til útoyggjar verður í dag røkt við nútímans tyrlum, ið hava hækkað tænastustigið munandi til gagns fyri útoyggjar, heilsuverk, sjófólk og ferðafólk.

Atlantic Airways strembar eisini eftir at vera ein virðismikil og virdur partur av samfelagnum, sum skapar virðir, førleikar og størv í Føroyum.

## Søgan hjá Atlantic Airways í stuttum

Atlantic Airways varð stovnað í 1987 stutt eftir, at Føroya Landsstýri hevði samráðst við donsku stjórnina um at loyva einum føroyskum flogfelag at kappast við donsku flogfeløgini, ið høvdu havt einkarrætt til flúgving millum Føroyar og Danmark.

Felagið hevur staðið fyri støðugt at menna flogferðsluna til og úr Føroyum líka síðani fyrstu flogferðina 28. mars í 1988. Talið á fráferðum til Keypmannahavnar er økt, og flogið verður upp til fýra ferðir um dagin, bæði morgun og kvøld. Síðan 1995 hevur felagið eisini bygt upp rutusamband við Noreg, Ísland og Bretland og Frakland, umframt farleiðir til heitari lond. Áhaldandi menningin hevur elvt til vøkstur á rutum felagsins úr 46.000 ferðandi í 1994 til 338.000 ferðandi í 2019. Felagið hevur samstundis áhaldandi gingið á odda at marknaðarføra Føroyar uttanlands og at menna ferðavinnuna í Føroyum.

Síðan 1994 hevur felagið røkt tyrluflúgving til útoyggjar. Leiting og bjarging (SAR/HEMS) síðani 2001. Harumframt hevur Atlantic Airways veitt tænastur til øll oljufeløg, ið hava tikið lut í oljuleiting í føroyskum sjógvi.

Síðani flogfelagið byrjaði sítt virksemi hevur tað lagt dent á at útbúgva lokala arbeiðsmegi í Føroyum at átaka sær eina røð av størvum innan flogvinnu. Atlantic Airways hevur útlært fleiri hundrað fólk sum mekanikarar, flogskiparar, flogternur og hópin av øðrum størvum innan flogvinnuna.

# Innihaldsyvirlit

**1. Alment**
1.1 Partafelagsupplýsingar ... 2
1.2 Atlantic Airways í stuttum ... 3
1.3 Høvuðs- og lyklatøl ... 5

**2. Leiðslufrágreiðing**
2.1 Leiðslufrágreiðing ... 6
2.2 Rakstrarfrágreiðing ... 8
2.3 Búskaparfrágreiðing ... 12
2.4 Hendingar eftir árslok ... 13
2.5 Útlit fyri 2020 ... 14
2.6 Eigaraviðurskifti ... 16
2.7 Frágreiðing um virkisleiðslu ... 17
2.8 Váðastýring ... 21
2.9 Vitanarstøði ... 23
2.10 Frágreiðing um samfelagsábyrgd ... 24

**3. Átekningar**
3.1 Leiðsluátekning ... 28
3.2 Átekning frá óheftum grannskoðara ... 30

**4. Roknskapartøl**
4.1 Rakstrarroknskapur ... 32
4.2 Fíggjarstøða pr. 31. desember 2019 ... 33
4.3 Frágreiðing um eginogn ... 35
4.4 Peningastreymsfrágreiðing ... 37
4.5 Yvirlit yvir notur ... 38
4.6 Notur ... 39

**5. Allýsingar**
5.1 Allýsingar ... 58

## 1.3 Høvuðs- og lyklatøl

| Rakstrarroknskapur (DKK 1.000) | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | 570.692 | 545.896 | 508.181 | 518.413 | 501.540 |
| Onnur inntøka | 3.625 | 980 | 6.932 | 5.120 | 3.486 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar (EBITDA) | 68.211 | 83.526 | 68.998 | 84.222 | 79.399 |
| Úrslit áðrenn fíggjarligar postar (EBIT) | 13.480 | 25.137 | 13.242 | 38.249 | 21.042 |
| Úrslit áðrenn skatt (EBT) | 9.479 | 19.758 | 4.074 | 34.137 | 21.516 |
| **Úrslit** | **7.831** | **16.201** | **3.341** | **27.993** | **17.643** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða (DKK 1.000)** | | | | | |
| Støðisogn tilsamans | 572.707 | 602.720 | 627.748 | 670.818 | 439.827 |
| Ogn í umferð tilsamans | 192.775 | 190.482 | 172.247 | 158.033 | 88.291 |
| **Aktiv tilsamans** | **765.482** | **793.201** | **799.995** | **828.850** | **528.118** |
| Eginogn | 258.630 | 242.047 | 232.384 | 223.754 | 189.974 |
| Avseting | 45.519 | 41.879 | 39.758 | 37.863 | 30.448 |
| Langfreistað skuld tilsamans | 344.743 | 375.494 | 407.770 | 436.386 | 169.764 |
| Stuttfreistað skuld tilsamans | 116.590 | 133.781 | 120.083 | 130.847 | 137.932 |
| **Passiv tilsamans** | **765.482** | **793.201** | **799.995** | **828.850** | **528.118** |
| | | | | | |
| **Peningastreymar (DKK 1.000)** | | | | | |
| Peningastreymar frá rakstri | 47.625 | 81.797 | 51.162 | 106.329 | 55.041 |
| Peningastreymar frá íløguvirksemi* | -22.335 | -29.807 | -11.206 | -274.044 | -199.786 |
| Peningastreymar frá fíggjarvirksemi | -31.096 | -31.096 | -31.096 | 254.598 | 85.183 |
| **Peningastreymar tilsamans fyri árið** | **-5.806** | **20.895** | **8.861** | **86.883** | **-59.561** |
| | | | | | |
| **Herav keyp af materiellari støðisogn* | *-27.404* | *-30.327* | *-13.396* | *-284.648* | *-214.132* |
| | | | | | |
| **Fíggjarlig lyklatøl** | | | | | |
| EBITDAR (DKK 1.000) | 87.838 | 97.361 | 82.502 | 107.559 | 107.226 |
| EBITDAR (%) | 15% | 18% | 16% | 21% | 21% |
| Ognaravkast (%) | 2% | 3% | 2% | 5% | 4% |
| Gjaldførisevni (%) | 165% | 142% | 143% | 121% | 64% |
| Solvensprosent (%) | 34% | 31% | 29% | 27% | 36% |
| Renting av eginogn eftir skatt (%) | 3% | 7% | 1% | 13% | 9% |
| | | | | | |
| **Ferðsluhagtøl** | | | | | |
| Ferðafólk – rutuflúgving | 338.183 | 307.533 | 280.344 | 282.062 | 267.126 |
| Ferðafólkatal – flogfør (rutu- og leiguflúgving) | 445.639 | 436.558 | 375.109 | 328.001 | 309.534 |
| Flogtímar – flogfør (block hours) | 7.742 | 7.005 | 6.903 | 7.005 | 6.903 |
| Útboð av tøkum setrakilometrum – rutuflúgving (ASK) (1.000) | 617.223 | 531.897 | 527.684 | 502.670 | 485.281 |
| Seldir setrakilometrar – rutuflúgving (RPK) (1.000) | 436.701 | 393.061 | 356.502 | 355.504 | 338.585 |
| Load faktorur – rutuflúgving (%) | 71% | 74% | 68% | 71% | 70% |
| | | | | | |
| **ANNAÐ** | | | | | |
| Starvsfólk (ársverk) | 195 | 184 | 180 | 173 | 171 |
| Flogfør í rakstri pr. 31. desember | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 |
| Tyrlur í rakstri pr. 31. desember | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 |

# 2.1 Leiðslufrágreiðing

## Rakstur 2019
Ársúrslitið í 2019 gjørdist lakari fyri Atlantic Airways enn árið fyri. Úrslit eftir skatt í konsernroknskapinum var 7,8 mió. kr. í 2019 samanborið við 16,2 mió. kr. í 2018. Lægri miðalferðaseðlaprísir, hægri oljuútreiðslur, lægri leiguvirksemi, seinkan av nýggjum flogfari og menning av nýggjari flogrutu høvdu neiliga ávirkan á ársúrslitið, meðan fleiri ferðafólk ávirkaðu úrslitið jaliga. Úrslitið áðrenn skatt varð 9,5 mió. kr. í 2019 samanborið við 19,8 mió. kr. í 2018. Úrslitið áðrenn av- og niðurskrivingar (EBITDA) var 68 mió. kr. í 2019 samanborið við 84 mió. kr. í 2018, lækkanin er 18%. Søluinntøkur vóru 578,8 mió. kr. í 2019, ið eru 6% hægri enn í 2018, tá ið søluinntøkurnar vóru 546,9 mió. kr.

## Trý spildurnýggj A320neo flogfør ávegis
Í øðrum ársfjórðingi 2020 økist flotin úr trimum upp í fýra flogfør, tá ið Atlantic Airways yvirtekur annað spildurnýggja Airbus 320neo flogfarið, ið felagið leigar frá Amerikanska felagnum, Air Lease. Sáttmáli er eisini gjørdur við Airbus flogverksmiðjuna um, at keypa tvey nýggj Airbus A320neo flogfør, ið verða latin Atlantic Airways ávikavist í fjórða ársfjórðingi í 2023 og fyrra hálvári í 2024. Nýggju flogførini eru við til at framtíðartryggja felagið.

Airbus A320neo flogførini, ið taka 174 ferðafólk, eru tey mest orkusparandi av sínum slagi. Nýggju flogførini verða, eins og verandi flogfør, útgjørd við framkomnu navigatiónstøknifrøðini frá Airbus, RNP AR 0.1, ið seinastu árini hava bøtt munandi um stundvísið og reglusemið á farleiðunum til og úr Vágum.

## Leggja dent á burðardygd
Flúgving til og úr Føroyum hevur ein týðandi leiklut at veita ungdómi, vinnulívi, heilsuverki, einstaklingum og familjum fjøltáttaðar møguleikar í altjóða samfelagnum, samstundis sum ferðavinna gerst ein lønandi vinnugrein í føroyska búskapinum.

Atlantic Airways leggur stóran dent á burðardygd og hevur sum mál at flúgva so umhvørvisvinarliga sum gjørligt. Seinastu tólv árini er CO2-útlátið fyri hvørt ferðafólk á farleiðum felagsins fallið við 34%, orsaka av nýggjari og størri flogførum. Roknast kann við, at útlátið fyri hvørt ferðafólk fellur enn meira næstu árini, so hvørt sum størri partur av framleiðsluni verður við nýggjum Airbus A320neo flogførum, ið nýta minni av brennievni og lækka CO2-útlátið við í minsta lagi 15% í mun til gomlu Airbus flogførini.

Í sambandi við umhvørviskrøv frá ES-myndugleikum, hevur Atlantic Airways síðani 2010 skrásett alla brennievnisnýtslu og CO2-útlát í sambandi við flúgving felagsins. Felagið er fevnt av CO2-kvotaskipanini hjá ES fyri flúgving í ES og EFTA londum og verður frá 2021 eisini fevnt av CORSIA (Carbon Offsetting and Reduction Scheme for International Aviation), ið er altjóða marknaðarskipan fyri CO2-útlát, ið ásetur, at flogvinnan næstu árini skal mótrokna allan vøkstur í CO2 útláti frá altjóða flúgving millum lond, ið luttaka. Mótrokningin skal gerast við íløgum í góðkendar verkætlanir, ið minka um CO2 útláti í heiminum. Í løtuni luttaka 81 ICAO-limalond í CORSIA skipanini.

Vistveiting umborð á flogførunum er eisini umløgd til burðardyggan borðbúnað og íløt, ið verða niðurbrotin náttúrliga, samstundis sum til ber at bíleggja mat frammanundan fráferð og minkað er um úrvalið umborð. Felagið arbeiðis áhaldandi við at menna burðardyggar loysnir á øllum økjum, ið kunnu viðvirka til bjartari framtíð fyri okkum øll og komandi ættarlið.

## Mið og mál
Atlantic Airways hevur sum sítt fremsta mál at knýta Føroyar at umheiminum til frama fyri føroyingar og føroyska samfelagið, samstundis sum rutunetið eisini gevur útlendingum fleiri møguleikar at vitja Føroyar, og fyri at knýta oyggjarnar saman og skapa tryggleika. Flogið verður fyri Føroyar við einum regluligum, smidligum og fjølbroyttum rutuneti og við tænastum við kappingarførum prísum. Felagið flýgur við framkomnari tøkni og útgerð og nýtir nútímans samskifti, har kundin er í miðdeplinum. Samskapað verður við kundar og samfelag um tænastur og upplivingar.

Hjá Atlantic Airways er trygdin í hásæti, stundvísi eitt mál, kundin í miðdeplinum, starvsfólkini dugnalig og tænastusinnað og úrslitini skapa virði. Virkisøki felagsins eru rutuflúgving og tyrlutænastur við Føroyum sum hornasteini og leiguflúgving við tøkari orku. Harumframt luttekur felagið í menning av ferðavinnu, farmaflutningi og øðrum flutningi og handilsøkjum, ið verða ment úr kjarnuførleikum okkara.

## Áhaldandi menning
Felagið virkar áhaldandi fyri neyðugum broytingum, ið tæna kundum okkara og felagnum á skilagóðan hátt. Hesum halda vit áfram við. Atlantic Airways gongur á odda at menna flogsambandið við útheimin og føroysku ferðavinnuna. Tí fer felagið seinni í ár undir beinleiðis flúgving nakrar túrar ár-

liga millum Vágar og New York, samstundis sum útboðið av flogsetrum á fjølbroyttu farleiðum felagsins ongantíð hevur verið størri enn nú.

## Codeshare samstarv

Felagið arbeiðir miðvíst við at styrkja um samstarvið við onnur flogfeløg. Í 2019 varð codeshare samstarv undirskrivað við KLM og Air France, ið merkir at fleiri av høvuðsfarleiðunum hjá Atlantic Airways eisini hava KLM og Air France flognummur, so ferðafólk við hesum feløgum eisini kunnu ferðast allan vegis til Føroyar, og inniber at Føroyar eru settar á sølulista á øllum ferðamálum hjá KLM og Air France. Atlantic Airways hevur ætlanin um fleiri tílík samstørv næstu tíðina.

## Hilton Garden Inn Faroe Islands

Á sumri 2020 letur felagið upp nýtt altjóða hotell í Havn. Nýggja Hilton Garden Inn hotellið, ið hevur 130 kømur og fimm fundar- og ráðstevnuhølir, verður partur av heimsumfatandi og navnframu Hilton-ketuni, ið hevur umleið 85 milliónir fólk í sínum kundanetverki, og sum kann draga ferðafólk til Føroyar úr m.a. USA og Asia, har Hilton-ketan er serliga sterk. Hotellið verður rikið av dótturfelagnum P/F Hotel Atlantic, ið saman við eftirlønarfelagnum LÍV, eigur Ognarfelagið matr. nr. 1332e, ið byggir hotellið.

## Kappingarstøðan

Á rutum felagsins ferðaðust 10% fleiri ferðafólk í 2019 samanborið við 2018, meðan ferðafólkatalið umvegis Vága Floghavn øktist við 12%. Kappingarstøðan á Keypmannahavnarfarleiðini við stórum útboði av flogsetrum í mun til eftirspurning hevði við sær lægri miðal ferðaseðlainntøkur í 2019. Atlantic Airways takkar føroyingum og útlendingum fyri at hava tikið so væl undir við felagnum og farleiðum okkara.

## Stundvísið

Í 2019 varð flogið rættstundis í 85% av øllum fráferðum – t.e. seinking styttri enn 15 minuttir. Seinastu fimm árini er stundvísið batnað 10 prosentstig. Íløgan hjá felagnum í nýggju tøknina, RNP AR 0.1 hevur havt stóra ávirkan á, at stundvísið er batnað seinastu fýra árini. Við mest framkomnu navigatiónstøknini í Evropa kunnu øll flogførini hjá Atlantic Airways lenda í Vágum í munandi verri sýni enn fyri nøkrum árum síðani.

## Rakstrarútlit 2020

Áhugin fyri Føroyum sum ferðamáli er vaksandi, tó er sannlíkt at coronafarsóttin fær neiliga ávirkan á ferðafólkatalið í 2020. Felagið væntar, at ársúrslitið í 2020 verður lægri enn í 2019. Inntøkur fyri hvørt ferðafólk eru merktar av kappingarstøðuni við stórum útboði av flogsetrum í mun til ferðafólkatal.

# 2.2 Rakstrarfrágreiðing

Samlaða ferðafólkatalið við rutuflogførum felagsins hækkaði úr 307.533 ferðafólkum í 2018 upp í 338.183 ferðafólk í 2019. Vøksturin er 10%. Flogførini vóru samanlagt 8.830 blokktímar á flogi samanborið við 8.576 blokktímar í 2018. Framleiðsluvøksturin er 3%.

Samlaða framleiðslan (tal á blokktímum) vaks við 3% í 2019 samanborið við 2018. Flogfør og tyrla vóru samanlagt 9.736 blokktímar á flogi í 2019 samanborið við 9.463 blokktímar í 2018.

Rutuflúgvingin stóð fyri 64% av samlaðu framleiðsluni í 2019, leiguflúgving 27% og tyrluflúgving 9%. Í 2018 var býtið 60% í rutuflúgving, 31% í leiguflúgving og 9% í tyrluflúgving.

Rutuflúgvingin øktist við 10% úr 5.633 blokktímum í 2018 upp í 6.213 blokktímar í 2019.

Leiguflúgvingin minkaði við 11% úr 2.943 blokktímum í 2018 niður í 2.617 blokktímar í 2019.

Tyrluflúgving varð stórt sæð óbroytt í 2019. Tímatalið var 906 í 2019 samanborið við 887 tímar í 2018.

**Framleiðsla í blokk tímum 2015-2019**




**Tal av ferðafólkum**




**Árstíðarsveiggj - ferðafólk 2019**




**Ferðslan**

| Ferðafólk | 2019 | 2018 | Broyting | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| Flogfør, rutuflúgving | 338.183 | 307.533 | 30.650 | 10% |
| Tyrla | 14.541 | 12.939 | 1.602 | 12% |

| Flogtímar (blokk) | 2019 | 2018 | Broyting | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| Flogfør, rutuflúgving | 6.213 | 5.633 | 580 | 10% |
| Flogfør, leigutúrar | 2.617 | 2.943 | -326 | -11% |
| **Flogfør tilsamans** | **8.830** | **8.576** | **254** | **3%** |
| Tyrla | 906 | 887 | 19 | 2% |
| **Flogtímar tilsamans** | **9.736** | **9.463** | **273** | **3%** |

## Rutuflúgving

Ferðafólkatalið við rutuflogførum vaks við 10% í 2019 upp í 338.183 ferðafólk. Vøksturin var 30.650 ferðafólk, ið stava frá flestu rutum felagsins. Yvirskotskapasitetur á Keypmannahavnarfarleiðini hevur framvegis neiliga ávirkan á miðal ferðaseðlaprís og nýtslustig (load factor) felagsins. Vøksturin umvegis Vága Floghavn í 2019 var 46.468 ferðafólk, ið svarar til 12%.

Árstíðarsveiggini í rutuflúgvingini eru høg. Tí verður t.d. í lágárstíð flogið 16 ferðir um vikuna til Danmarkar, og flogið verður 35 ferðir um vikuna í háárstíð.

## Leiguflúgving

Leiguflúgvingin lækkaði úr 2.943 blokktímum í 2018 niður í 2.617 blokktímar í 2019.

Felagið leigar út avlopsorku, ið tørvur ikki er á í rutuflúgvingini, til leiguflúgving fyri harvið at betra um lønsemið. Felagið hevur í 2019 flogið charter-túrar fyri donsk ferðavinnufeløg, ad hoc flúgving kring Evropa, umframt ACMI-flúgving. Størsta leiguvirksemi í 2019 var leiguflúgving fyri væl umtóktu, donsku ferðaskrivstovuna FolkeFerie.dk. Atlantic Airways hevur langtíðaravtalu við FolkeFerie.dk um leiguflúgving úr Danmark til ymisk ferðamál sunnanfyri.

Íkastið frá leiguflúgvingini til úrslit felagsins er í høvuðsheitum knýtt at tali av blokktímum og skiftisavlopi fyri hvønn tíma, meðan søluinntøkur í størri mun eru ávirkaðar av hvørjum slagi av leiguflúgving, talan er um. ACMI túrar verða seldir fyri lægri søluprís, orsaka av at kundin (flogfeløg) ber ein stóran part av flogkostnaðinum.

**Flogtímar (blokk tímar)**




## Tyrluflúgving

Tyrluvirksemið í 2019 var í høvuðsheitum leiting og bjarging fyri Fiskimálaráðið og rutuflúgving til útoyggjar fyri Standfaraskip Landsins við tveimum nútímans AW139 tyrlum. Tyrlurnar eru til reiðar til leiting og bjarging (SAR) alt samdøgrið allar dagar í árinum. Tyrlur felagsins vóru á flogi 906 blokktímar í 2019 samanborið við 887 blokktímar í 2018. Inntøkugrundarlagið í tyrluvirkseminum er í høvuðsheitum sáttmálabundar inntøkur fyri tyrlutilbúgving og útoyggjaflúgving.

**Flogtímar (blokk tímar)**




Tíggju ára sáttmáli er við Føroya Landsstýrið um tyrlutilbúgving og innanoyggja flúgving til útoyggjar. Sáttmálatíðarskeiðið er frá 2016 til og við 2025. Tænastustøðið er munandi hækkað við teimum báðum nýggju AW139 tyrlunum, ið kunnu flúgva heilt út á 200 fjórðinga sjómarkið, har tær kunnu arbeiða í 30 minuttir í bjargingarátøkum. Tyrlurnar taka 14 ferðafólk samanborið við 9 ferðafólk við gomlu Bell 412 tyrlunum.

Bjargingartyrlan varð boðsend 72 ferðir í 2019 samanborið við 74 ferðir í 2018. Felagið hevur røkt innanoyggja rutuflúgving til útoyggjar síðani 1994, og leiting og bjarging síðani byrjan í 2001.

## Onnur inntøkuøki

Saman við Vága Floghavn hevur Atlantic Airways stovnað felagið P/F Duty Free, ið rekur tollfría sølu á flogvøllinum í Vágum. Atlantic Airways eigur eisini dótturfelagið Hotel Atlantic, ið letur nýtt hotell upp í Havn á sumri 2020. Nýggja hotellið, við navninum Hilton Garden Inn Faroe Islands, verður rikið í samstarvi við altjóða hotellketuna Hilton.

Við rutuflogførum felagsins stílar Atlantic Airways eisini fyri loftvegis farma- og postflutningi millum Føroyar og útheimin.

# 2.2 Rakstrarfrágreiðing (Framhald)

## Flotin

Við árslok 2019 taldi flotin trý flogfør: Eitt flogfar av slagnum Airbus A320neo, eitt Airbus A320 og eitt Airbus A319. Felagið eigur sjálvt tvey av flogførunum, meðan felagið langtíðarleigar nýggja A320neo flogfarið, ið varð handað felagnum í juli 2019. Eitt langtíðarleigað A319 flogfar varð latið útleigaranum aftur á sumri 2019. A320 flogførini taka 174 ferðafólk og A319 tekur 144 ferðafólk. Miðalaldurin á flogførunum er umleið fýra ár.

Í øðrum ársfjórðingi 2020 verður flotin øktur úr trimum upp í fýra flogfør, tá ið annað Airbus A320neo flogfar verður latið felagnum. Flogfarið verður langtíðarleigað.

A320neo flogførini hava 15% lægri oljunýtslu og $CO_2$ útlát enn verandi Airbus flogførini.

Í juni 2019 skrivaði Atlantic Airways undir sáttmála um, at keypa tvey nýggj Airbus A320neo flogfør frá Airbus-verksmiðjuni. Fyrra flogfarið verður liðugt seint í 2023 og seinna flogfarið fyrra hálvár 2024.

Sambært Airbus-verksmiðjuni flýgur Atlantic Airways við mest framkomnu navigatións-tøknini í Evropa. Sum fyrsta flogfelag í heiminum fór felagið í 2014 undir at nýta RNP AR 0.1 navigatións-skipanina sameint við innflúgvingarskipanina ILS. Skipanin verður nýtt til føroyaflúgvingina og ger, at øll flogførini hjá Atlantic Airways kunnu lenda í Vágum í munandi verri sýni enn áður. Íløgan í RNP AR 0.1 hevur seinastu árini tryggjað ferðafólki munandi hægri reglusemi í Vágum enn árini frammanundan.

**Flotin 31. desember 2019**

| Floti við ársenda | Tal | Ogn | Fram-leiðsluár |
|---|---|---|---|
| A320neo | 1 | 0 | 2019 |
| A320 | 1 | 1 | 2016 |
| A319 | 1 | 1 | 2012 |
| AW139 | 2 | 2 | 2015/2016 |

Við árslok 2019 taldi tyrluflotin tvær Agusta Westland AW139 tyrlur. Miðalaldurin á tyrluflotanum er umleið fýra ár.

















Mynd: Nicolás Vera-Ortiz

# 2.3 Búskaparfrágreiðing

## Búskaparliga gongdin, 1. januar – 31. desember 2019

### Søla

Atlantic Airways hevði 574,3 mió. kr. í søluinntøkum í 2019 samanborið við 546,9 mió. kr. í 2018. Vøksturin var 27,4 mió. kr, ið serstakliga stavar frá fleiri ferðafólkum.







### Rakstrarútreiðslur

Rakstrarútreiðslur øktust við 34 mió. kr. í 2019 upp í 380 mió. kr. samanborið við 2018. Økingin stavar í høvuðsheitum frá øktum flogvirksemi, hægri útreiðslum til brennievni og prístryggingar, fleiri ferðafólkum og øktum útreiðslum at leiga flogfar.

Ein av størstu útreiðslunum í flogvinnuni er brennievni. Í 2019 var brennievni, íroknað útreiðslur til $CO_2$ kvotakeyp, 20% av samlaðu rakstrarútreiðslunum, sammett við 19% í 2018. Felagið hevur lutvíst prístryggjað brennievnisnýtslu. Tað ger, at altjóða prísbroytingar hava seinkaða ávirkan á brennievnisútreiðslur felagsins.

### Starvsfólkaútreiðslur

Starvsfólkaútreiðslur vóru 126,4 mió. kr. í 2019, samanborið við 114,0 mió. kr. í 2018. Ársverkini vóru 195 í tali í 2019, sammett við 184 í 2018.

### Avskrivingar

Av- og niðurskrivingar vóru 55 mió. kr. í 2019 samanborið við 58 mió. kr. í 2018.

### Fíggjarpostar

Fíggjarpostar vóru netto 4 mió. kr. í 2019 samanborið við 5,4 mió. kr. í 2018.

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist 9,5 mió. kr. í avlopi í 2019 samanborið við 19,8 mió. kr. í 2018.

Ársúrslitið eftir skatt gjørdist eitt avlop á 7,8 mió. kr. í 2019 samanborið við 16,2 mió. kr. í 2018.

Renting av eginognini eftir skatt gjørdist 3 prosent í 2019 samanborið við 7 prosent í 2018.



## Fíggjarstøða

**Ogn**
Støðisognin er lækkað við 30 mió. kr. í 2019 úr 603 mió. kr. við ársbyrjan niður í 573 mió. kr. við ársenda 2019.

Ogn í umferð hækkaði við 3 mió. kr. í 2019 úr 190 mió. kr. við ársbyrjan upp í 193 mió. kr. við ársenda 2019.

Tøki peningurin í konsernroknskapinum við ársenda 2019 var 151 mió. kr. samanborið við 157 mió. kr. við ársbyrjan.

**Eginogn**
Við árslok var eginognin í felagnum 259 mió. kr. og solvensprosentið 34%. Samanborið við ársbyrjan er eginognin økt við 17 mió. kr., og solvensprosentið er hækkað trý prosentstig.

**Skuld**
Við árslok var samlaða skuldin í felagnum 507 mió. kr. samanborið við 551 mió. kr. við árslok árið fyri. Langfreistaða skuldin er lækkað úr 375 mió. kr. við ársbyrjan niður í 345 mió. kr. við árslok 2019.

**Fíggjarstøða**
Fíggjarstøða felagsins javnvigaði 31. desember 2019 við 765 mió. kr., ið er 28 mió. kr. lægri enn árið fyri.

**Framhaldandi rakstur (Going concern)**
Nevnd og stjórn hava í sambandi við viðgerð av ársfrásøgn mett um niðurstøðu um framhaldandi rakstur (going concern assumption). Í hesum sambandi eru nevnd og stjórn komin til ta niðurstøðu, at á fráboðanardegnum fyriliggja eingi viðurskifti, ið sáa iva um, at felagið er ført fyri og fer at halda fram við framhaldandi rakstri (going concern) til í minsta lagi næsta roknskaparár. Tískil er ársroknskapurin settur upp við framhaldandi rakstri fyri eygað.

**Býti av ársúrsliti**
Uppskotið um býtið av ársúrslitinum sæst í rakstrarroknskapinum.

## 2.4 Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

# 2.5 Útlit fyri 2019

## Flogvinna og altjóða búskapur

Sambært altjóða loftferðslufelagsskapinum, IATA (International Air Transport Association), verður roknað við lækking í evropeiskari flogferðslu í 2020 samanborið við 2019 orsaka av coronafarsóttini. Vøksturin í 2019 gjørdist 4,3%. Flogvinnan í Evropa er merkt av harðari kapping, lágum ferðaseðlaprísum og høgum kostnaði í sambandi við myndugleikakrøv, umframt ávirkan av coronafarsóttini og tiltøkum, ið eru og verða sett í verk, til tess at minka um ávirkanina av farsóttini.

Vinnubygnaðurin í flogvinnuni er í eini broytingartíð við fleiri flogfeløgum, ið flagga manningar út til lágskattalond, og framgongd er hjá lágprísflogfeløgum. Loftferðslumarknaðurin er tætt knýttur at búskaparligu gongdini í heimlondunum, haðani ferðafólkini koma frá.

Altjóða prísurin á brennievni lækkaði eitt vet í 2019 og verður av IATA mettur at lækka í 2020.

## Føroyski búskapurin

Sambært nýggjastu frágreiðingini frá Búskaparráðnum verður mett, at vøksturin í føroysku bruttotjóðarinntøkuni í leypandi prísum verður 7,0% í 2020, sammett við 9,0% í 2019. Øking er í innlendska eftirspurninginum, serliga í privatu nýtsluni, samstundis sum útflutningurin er øktur. Búskaparráðið mælir til størri avlop hjá landskassanum fyri at sleppa undan at tátta í, tá niðurgongd aftur kemur í búskapin. Arbeiðsloysi er í løtuni 0,9% og fólkatalið komið upp á 52.000 í 2019.

## Rutuflúgving

Í 2020 bjóðar Atlantic Airways ferðafólki beinleiðis flúgving til og úr Føroyum til 11 ymisk ferðamál: Keypmannahavn, Billund, Aalborg, Bergen, Reykjavík, Edinburgh, Barcelona, Mallorka, Gran Canaria, París og London. Harumframt verður miðað eftir at flúgva nakrar ferðir beinleiðis millum Vágar og New York seinni í 2020.

Rutuflogfør felagsins flúgva regluliga fleiri ferðir um dagin millum Føroyar og Keypmannahavn, umframt at regluligt flogsamband er til Billund, Reykjavík, Bergen, Edinburgh og París.

Harumframt bjóðar felagið SÓL-rutur við beinleiðis flúgving til Barcelona frá apríl til oktober, til Mallorka frá juni til august og til Gran Canaria frá desember til apríl.

Áhugin fyri Føroyum sum ferðamál er vaksandi, samstundis sum lágir ferðaseðlaprísir og búskaparvøkstur í Føroyum hava jaliga ávirkan á flogferðsluna. Tó kann coronafarsóttin fáa neiliga ávirkan á ferðafólkatalið í 2020. Yvirskotskapasitetur á Keypmannahavnarfarleiðini verður mettur at hava neiliga ávirkan á miðal ferðaseðlaprís felagsins.

Atlantic Airways fyrireiðkar seg til framhaldandi vøkstur í føroysku ferðavinnuni við nýggja Hilton Garden Inn hotellinum, ið letur upp á sumri 2020, og við næsta orkusparandi A320neo flogfarinum, ið verður latið felagnum á vári 2020.

Felagið knýtir Føroyar at umheiminum við regluligum, smidligum og fjølbroyttum rutuneti og tænastum við kappingarførum prísum.

## Leiguflúgving

Leiguflúgving felagsins byggir á at gagnnýta tøka orku, ið tørvur ikki er á í rutuflúgvingini, fyri harvið at økja um lønsemið. Leiguvirksemið í 2020 verður væntandi hægri enn í 2019, í sambandi við, at flotin verður øktur úr trimmum upp í fýra flogfør. Meira enn helmingurin av leiguflúgvingini er fyri donsku ferðaskrivstovurnar, Folkeferie.dk og Primo Tours. Flogið verður úr Danmark til ymisk ferðamál sunnanfyri.

Harumframt verður í 2020 flogið leiguflúgving fyri ferðavinnufeløg úr Danmark, umframt nakað av ad-hoc flúgving kring Evropa. Við altjóða góðskugóðkenning bjóðar felagið seg eisini í størri mun fram á ACMI marknaðinum at flúgva fyri onnur flogfeløg. Stór kapping er innan leiguflúgving.

### Tyrluflúgving

Atlantic Airways knýtir oyggjarnar saman við rutuflúgving til útoyggjar og skapar tryggleika við nútímans tyrlutilbúgving. Við støði í 10 ára sáttmála við Føroya Landsstýrið røkja tvær lutfalsliga nýggjar AW139 tyrlur innanoyggja flúgving til útoyggjar og eru tøkar til leiting og bjarging (SAR) alt samdøgrið allar dagar í árinum. Virksemið í 2020 verður á sama stigi sum í 2019.

### Rakstrarútlit 2020

Felagið væntar, at ársúrslitið í 2020 verður lægri enn í 2019. Kappingarstøðan á Keypmannahavnarfarleiðini, coronafarsóttin og aðrir váðar, ið nevndir eru í ársfrásøgnini undir váðastýring kunnu tó ávirka rakstur og fíggjarstøðu felagsins.




Mynd: Nicolás Vera-Ortiz

# 2.6 Eigaraviðurskifti

## Partapeningur

Partapeningur felagsins er óbroyttur 103.500.000 kr. Partapeningurin er lutaður sundur í 1.035.000 partabrøv. Eingi partabrøv hava framíhjárættindi. Hvørt partabræv hevur eina atkvøðu.

## Partaeigarar

Føroya Landsstýrið (Fíggjarmálaráðið) eigur 67% av partabrøvunum, meðan 33% av partabrøvunum eru egin partabrøv hjá felagnum.

## Vinningsbýti

Nevndin leggur uppskot fyri ársaðalfund felagsins, ið verður í apríl 2020, at einki vinningsbýti verður útlutað partaeigaranum í Atlantic Airways. Uppskotið er í samsvari við løgtingslóg frá februar 2014 um at keypa aftur privatu partabrøvini í P/F Atlantic Airways. Einki vinningsbýti varð útlutað í 2019 fyri roknskaparárið 2018.

## Kapital- og partabrævabygnaður

Nevnd felagsins er av teirri áskoðan, at kapital- og partabrævabygnaður, kós og langtíðar virðisskapan felagsins tæna áhugamálum partaeigarans og felagsins.

# 2.7 Frágreiðing um virkisleiðslu

Í hesum parti er frágreiðing um virkisleiðslu felagsins. Frágreiðingin er partur av leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini fyri Atlantic Airways fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2019.

Eftir at felagið varð tikið av virðisbrævamarknaðunum í Keypmannahavn og Reykjavík, er ikki neyðugt hjá felagnum longur at taka støðu til leiðreglur fyri virkisleiðslu. Atlantic Airways hevur kortini valt at fylgja donsku leiðreglunum um virkisleiðslu og eftirlíka tilmælum, har tað letur seg gera. Eitt yvirlit við felagsins frágreiðing um virkisleiðslu í mun til donsku tilmælini sæst á heimasíðu felagsins **https://www.atlantic.fo/en/about-us/the-company/governance/corporate-governance**

Donsku tilmælini um leiðreglur fyri virkisleiðslu vóru seinast givin út í november 2017 og galda frá roknskaparárinum 2018. Fult yvirlit við donsku leiðreglunum fyri virkisleiðslu eru at finna á heimasíðuni **www.corporategovernance.dk**

Niðanfyri verður greitt frá høvuðstættunum í virkisleiðslu felagsins.

## Aðalfundur

Aðalfundurin er hægsti myndugleiki felagsins og verður hildin av partaeigarunum eftir ásetingunum í viðtøkum felagsins. Ársaðalfundur verður hildin hvørt ár, áðrenn apríl mánaður er liðugur. Partaeigarar og teirra ráðgevar, umframt fjølmiðlar hava atgongd til aðalfundin.

## Nevndin

Nevndin sær til, at virksemi felagsins er skynsamliga fyriskipað, umframt at taka sær av heildar viðurskiftum felagsins og tryggjar sær at áhugamál partaeigarans verða røkt á bestan hátt. Nevndin virkar fyri langtíðarmenning av felagnum og strembar eftir at samsvar er millum fyriskipan og rakstur.

Nevndin fyri Atlantic Airways er mannað við seks limum, harav starvsfólkini hava valt tvey umboð. Val av starvsfólkavaldum nevndarlimum fer fram sambært galdandi lóggávu á økinum. Aðalfundurin velur fýra nevndarlimir.

Nevndarlimir í Atlantic Airways eiga at hava hóskandi førleikar og vera sinnaðir at nýta neyðuga orku og tíð til nevndararbeiðið. Hesi førleikaøki eiga helst at verða umboðað í nevndini: royndir í flogvinnu ella aðrari flutningsvinnu, viðkomandi vinnuligar royndir, leiðsluroyndir, ið samsvara støðd og endamál felagsins, royndir frá almennari umsiting, búskaparstýring, løgfrøðilig vitan og/ella royndir, strategiskur serkunnleiki og royndir við broytingarleiðslu. Hesir førleikar eru ikki einans yvirlit yvir førleikar nevndarlimanna, men umboða eisini fjølbroytni nevndarinnar innan viðkomandi førleikar og vitan.

Leiklutur formansins er at skipa og leiða nevndarfundir, at røkja samband við stjórn, fyrireika fundarskrá og tryggja at nevndarlimir fáa fundartilfar í góðari tíð, áðrenn fundur verður hildin, kunna nevnd og tryggja at týdningarmiklastu mál felagsins verða viðgjørd, umframt tryggja at lógarásetingar verða hildnar og verða uttanhýsis talsmaður.

Høvuðsuppgávan hjá næstformanninum er at traðka til sum virkandi formaður, verður hetta neyðugt, umframt at verða virkin samstarvsfelagi formansins.

Nevndin setur ein ella fleiri stjórar at hava dagliga leiðslu felagsins um hendi.

Nevndin heldur fundir, tá nevndarformaðurin metir, tað verða neyðugt, ella tá ein av nevndarlimunum ella stjórnin setur fram ynski um hetta.

Nevndin hevur havt 8 fundir í 2019.

# 2.7 Frágreiðing um virkisleiðslu (Framhald)

## Nevndin

### Niels Mortensen, Nevndarformaður

**Føddur:** 28. oktober 1966 (maður)
**Bústaður:** Traðavegur 12, FO–100 Tórshavn
**Tók við nevndarsessi:** Mars 2013
**Serligir førleikar:** Vinnuroyndir
**Starv:** Forstjóri í SMS P/F og NM Holding
**Royndir:** Danske Bank 1987–1992, P/F SMS 1992–
**Aðrir nevndarsessir:** P/F Hotel Atlantic (nevndarformaður), P/F Ognarfelagið matr. nr. 1332e (stjóri og nevndarlimur), P/F Petur Larsen og P/F Duty Free
**Útbúgving:** Niels Brock Business School, Danske Bank
**Valskeið endar:** Apríl 2020
*Mettur at vera óheftur at felagnum*

### Kaj Johannessen, Næstformaður

Nevndarformaður 1. januar – 8. mars í 2013
Næstformaður 2009–2012, og frá 14. mai 2013
Formaður í tilnevningarnevndini 2013
Formaður fyri grannskoðanarnevndini
**Føddur:** 8. november 1960 (maður)
**Bústaður:** Inni á Fløtum 13, FO–180 Kaldbak, Føroyar
**Tók við nevndarsessi:** Apríl 2009
**Serligir førleikar:** Royndur í fíggjar- og roknskaparmálum, landsfyrisiting og vinnu.
**Starv:** Stjóri í P/F Farcod, P/F Enniberg og P/F Ametyst og P/F Havborg.
**Royndir**: Stjóri í P/F Enniberg síðani 2016. Fulltrúi í Samferðslumálaráðnum 2015–2016. Fulltrúi í Fíggjarmálaráðnum frá 2013–2015. Fulltrúi í Innlendismálaráðnum 2008–2013. Bankafulltrúi í Føroya Banka (BankNordik) 2000–2008. Limur í formanskapinum í Búskaparráðnum 2006–2009. Búskaparfrøðingur, Landsbanki Føroya 1993–2000 og stjóri Menningargrunnur Ídnaðarins 1990–1993. Próvdómari í búskapi á Fróðskaparsetur Føroya 2001–2014. Próvdómari í virkisbúskapi á Føroya Handilsskúla 2009–2013.
**Aðrir nevndarsessir:** P/F Enniberg, P/F Farcod, P/F Havborg, P/F SMS, P/F Miðlon, P/F Dvøljan, Norriq Holding A/S, Investeringsselskabet af 5. oktober 2012 Aps og P/F Atlantic Petroleum.
**Útbúgving:** Kaj Johannesen er cand. merc. í búskaparfrøði og virkisleiðslu frá handilsháskúlanum í Keypmannahavn 1990, við denti á fíggjarmál, altjóða handil og við serkunnleika um fígging, altjóða handli og búskaparstýring
**Valskeið endar:** Apríl 2020
*Mettur at vera óheftur at felagnum*

### Laila Ísheim Hentze, nevndarlimur

**Fødd:** 5. januar 1972 (kvinna)
**Bústaður:** Gróthúsvegur 10, FO–188 Hoyvík
**Tók við nevndarsessi:** Apríl 2014
**Serligir førleikar:** Vinnuførleikar
**Starv:** Stjóri í Gallup Føroyar
**Royndir:** Televarpið, Stjóri 2003–2011
**Aðrir nevndarsessir:** P/F Hotel Atlantic
**Útbúgving:** Laila Ísheim Hentze hevur MSc í Business, Language and Culture frá Copenhagen Business School
**Valskeið endar:** Apríl 2020
*Mett at vera óheft at felagnum*

### Fróði Magnussen, nevndarlimur

**Føddur:** 18. juli 1969 (maður)
**Bústaður:** Oman Viðarlund 15, FO–100 Tórshavn
**Tók við nevndarsessi:** Apríl 2016
**Serligir førleikar:** Útbúgving og royndir innan vinnubúskap, fígging og strategi.
**Starv:** Stjóri í Formula P/F
**Royndir:** Stjóri í Formula P/F síðan juli 2009. Menningarleiðari á Formula, august 1996 – juli 2009. Verkætlanarleiðari Datacentret, Aarhus School of business, august 1993 – august 1996. Undirvíst parttíð á Føroya Handilsskúla innan virkisbúskap, fígging og strategi á bachelor (HD) støði síðan 1997
**Aðrir nevndarsessir:** P/F Ognarfelagið matr. nr. 1332e. Nevndarlimur í Formula 1998–2003 og aftur í 2015–. Nevndarlimur í Formula Solution og formaður síðan stovnan í 2003. Nevndarlimur í KT-felagnum síðan 2010, formaður í 2012–2014. Nevndarlimur í Framtak, síðan 2014. Nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014. Varalimur í Gjaldstovuráðnum (gjaldføris- og skuldarfyrisiting hjá landinum) frá 2012 til 2016, tá ið ráðið varð avtikið. Varalimur í nevndini fyri Landsbankan 2016 –
**Útbúgving:** : Cand. Merc; Aarhus Scool of Business
**Valskeið endar:** Apríl 2020
*Mettur at vera óheftur at felagnum*

### Eystein í Løðu, nevndarlimur

**Føddur:** 5. juli 1973 (maður)
**Bústaður:** Smiðjuvegur 14, FO–386 Bøur
**Tók við nevndarsessi:** Apríl 2019
**Serligir førleikar:** Starvsfólk í Atlantic Airways
**Starv:** Safety Manager
**Royndir:** Starvsfólk í Atlantic Airways síðani 1994, tó undantikið 2000–2001.
**Aðrir nevndarsessir:** Eingir
**Útbúgving:** Flogmekanikari og sálarviðgeri (psykoterapeut)
**Valskeið endar:** Apríl 2023
*Mett at vera heft at felagnum sum starvsfólkaumboð*

### Johan Vágadal, nevndarlimur

**Føddur:** 28. mars 1978 (maður)
**Bústaður:** Suðuroyavegur 17, FO–100 Tórshavn
**Tók við nevndarsessi:** Apríl 2019
**Serligir førleikar:** Starvsfólk í Atlantic Airways
**Starv:** Flogmaður í Atlantic Airways
**Royndir:** Starvsfólk í Atlantic Airways síðani 2005
**Aðrir nevndarsessir:** Eingir
**Útbúgving:** Flogskipari
**Valskeið endar:** Apríl 2023
*Mettur at vera heftur at felagnum sum starvsfólkaumboð*

# 2.7 Frágreiðing um virkisleiðslu (Framhald)

## Grannskoðanarnevnd

Nevndin hevur ikki fyriskipað serstaka grannskoðanarnevnd. Nevndin tók avgerð á nevndarfundi í mars 2010 um, at nevndin sjálv, í samsvari við § 29 í føroysku grannskoðanarlógini, tekur sær av uppgávunum hjá grannskoðanarnevndini. Sostatt er øll nevndin eisini grannskoðanarnevnd. Kaj Johannessen er formaður fyri grannskoðanarnevndina.

## Stjórn

Í stjórnini í Atlantic Airways sita forstjóri og fíggjarstjóri, ið hava ábyrgdina av dagliga rakstrinum.

Høvuðsuppgávur forstjórans er at taka sær av dagliga rakstri felagsins og útinna avgerðir nevndarinnar. Forstjórin vísir til nevndina og kunnar nevndina regluliga um gongdina í felagnum. Forstjórin skal eisini veita nevndini og grannskoðarum felagsins allar neyðugu upplýsingar, sum hesi biðja um, ið viðvíkja rakstri felagsins. Forstjórin hevur ábyrgd av, at felagið fylgir lógum og ásetingum í sambandi við ársroknskap og fíggjarligu støðu felagsins og hevur samstundis ábyrgd av at verja felagsins ognir. Harumframt er forstjórin „Accountable Manager" og hevur sostatt endaligu ábyrgdina mótvegis loftferðslumyndugleikunum.

Fíggjarstjórin hevur ábyrgd av búskapar- og fíggjarviðurskiftum, fyrisiting, starvsfólkadeild, teknisku deild, tyrludeild og KT.

### Jóhanna á Bergi, forstjóri

**Fødd:** 29. september 1970
**Bústaður:** Traðagøta 18, FO–700 Klaksvík
**Royndir:** Jóhanna á Bergi hevur verið forstjóri í Atlantic Airways síðani september 2015. Stjóri í Faroe Ship P/F 2006–2015, Sølu- og marknaðarstjóri í JFK 1998–2006 og søluleiðari hjá Faroe Seafood 1994–1998.
**Aðrir nevndarsessir:** P/F Hotel Atlantic (Stjóri og nevndarlimur), Visit Faroe Islands P/F, Føroya Grunnurin og Norðoya Íløgufelag, P/F Norðoyatunnilin.
**Útbúgving:** Jóhanna á Bergi er MSc í Management frá Robert Gordon University 2004, umframt útbúgving frá The Danish School of Export and Marketing 1994

### Marius Davidsen, fíggjarstjóri

**Føddur:** 31. juli 1958
**Bústaður:** Í Fornanum 3, FO–380 Sørvágur
**Royndir:** Marius Davidsen hevur verið fíggjarstjóri í Atlantic Airways síðani januar 2005. Marius Davidsen hevur verið starvsfólk í Atlantic Airways síðani tað byrjaði í 1987/88. Fíggjarleiðari síðani 1988 og varastjóri síðani juni 1993. Marius Davidsen var eisini stjóri í Duty Free P/F 2014–2018
**Aðrir nevndarsessir:** P/F Hotel Atlantic
**Útbúgving:** Hægri Handilsskúli frá Føroya Handilsskúli í Tórshavn

## Tekning av felagnum

Felagið verður teknað við undirskrift nevndarformansins og einum stjóra í felag ella við undirskrift av tveimum nevndarlimum í felag.

## Samsýning til nevnd og stjórn

Samsýningar til nevnd og stjórn verða ásettar við støði í samsýningarpolitikki felagsins, ið liggur á heimasíðu felagsins. Galdandi samsýningarpolitikkur varð samtyktur av nevndini og ársaðalfundinum í apríl 2012.

Samsýningarpolitikkurin hevur sum mál at tryggja felagnum eina góða fyritøkuleiðslu og at skapa karmar fyri langtíðar virðisskapan til partaeigarar felagsins.

Nevndin er lønt við fastari samsýning, ið ikki er knýtt saman við nakrari avriksskipan. Samsýningin er ásett til 120.000 kr. um árið. Nevndarformaðurin fær tvífalda samsýning, meðan næstformaðurin fær eina og eina hálva samsýning. Samsýning fyri grannskoðanarnevndina er ásett til 20.000 kr. um árið. Formaðurin í grannskoðanarnevndini fær trífalda samsýning. Um nevndarlimur átekur sær serligar ad-hoc uppgávur fyri felagið, ásetur nevndin fasta samsýning fyri slíkar uppgávur.

Nevndarsamsýningin er ásett við støði í førleikakrøvum, ábyrgd og avrikum hjá nevndarlimum og við atliti at virksemi felagsins og arbeiðsbyrðuni.

Stjórn felagsins er sett sambært stjórasáttmála. Gjørdar verða javnan eftirmetingar av lønini, herundir um tillagingar skulu gerast. Allar broytingar í galdandi stjórasáttmála skulu gerast skrivliga og góðkennast av nevnd felagsins.

Avgerandi fyri samsýning stjórnarinnar er, at hon tryggjar, at felagið framhaldandi er ført fyri at draga at sær og fasthalda stjórnarlimir við bestu førleikum. Samsýningin til stjórn felagsins verður samansett við støði í marknaðarsiðvenju og felagsins serliga tørvi.

Samsýningin til stjórnina kann fevna um fasta løn, kontantan bonus, umframt eftirløn. Samlaða støðið fyri føstu samsýningina verður ásett við atliti at marknaðarstøðinum, har millum annað støðd felagsins og rakstrargongdin verður tikin við í ásetanina. Í løtuni er samsýning til stjórn einans ásett við fastari løn og eftirløn, svarandi til ein ásettan part av føstu samsýningini.

### Innanhýsis eftirlit og váðastýring í sambandi við ársfrásøgnina

Nevnd og stjórn hava yvirskipaða ábyrgd fyri váðastýring felagsins og innanhýsis eftirliti í sambandi við uppsetan av roknskapi. Herundir ábyrgd fyri, at uppsetan av roknskapi er í samsvari við galdandi lóggávu og ásetingar. Eftirlits- og váðastýringsskipanir felagsins eru ætlaðar at eyðmerkja, stýra og minka um vandan fyri skeivleikum í ársroknskapinum og veita eina rímiliga, men tó ikki fullvísa, trygd fyri, at sleppast kann undan skeivari nýtslu av ognum, tapi og/ella týðandi skeivleikum í samband við uppsetan av roknskapi.

Nevnd og stjórn fyriskipa og góðkenna yvirskipaðan politikk, mannagongdir og eftirlit á týðandi økjum í sambandi við uppsetan av ársroknskapi.

Stjórnin hevur dagligu ábyrgdina fyri, at løgfrøðilig krøv og onnur krøv verða fylgd í sambandi við uppsetan av ársroknskapi og kunnar nevndina regluliga í hesum sambandi.

Nevndin kannar eftir árliga, og eftir tørvi, nýttan roknskaparhátt og møguligar broytingar, umframt roknskaparligar metingar í sambandi við uppsetan av ársfrásøgn.

Nevndin fyriskipar árliga eftirmeting av váðastýring felagsins og innanhýsis eftirliti, íroknað yvirskipaða váðameting í sambandi við uppsetan av ársroknskapi. Partur av hesi meting er at staðfesta váða fyri sviki og møguligar broytingar, ið neyðugar eru fyri at minka um ella burturbeina hendan váða.

Felagið hevur sett í verk mannagongd við regluligari kunning til nevnd felagsins hvønn mánað, ið inniheldur frágreiðing um frávik frá væntaðum úrslitum og høvuðstølum innan rakstarøki felagsins.

## 2.8 Váðastýring

Atlantic Airways kann vera fyri týðandi váðum, ið kunnu ávirka virksemi, rakstur og mál og mið felagsins. Staðfesting og stýring av váðum er týdningarmikil partur av virksemi hjá nevnd og stjórn. Við kunnleika í góðari tíð um týðandi váðar og møguleikar, megnar Atlantic Airways at fremja neyðugar broytingar og tillagingar í virksemi felagsins. Stjórnin kunnar nevndina regluliga um gongdina á týdningarmiklum váðaøkjum.

### Vanligir og serstakir váðar

Raksturin kann verða ávirkaður av gongdini í føroyska og altjóða búskapinum, eins og rakstur og fíggjarstøða felagsins kunnu ávirkast av kappingarstøðuni, oljuprísi, prísi á CO2-kvotum, broytingum í útlátsskipanum, eftirspurningi eftir flogferðum, eftirspurningi á leigutúrum við flogførum og tyrlum, gjaldoyrabroytingum, kostnaðarstigi, veðri, øsku frá eldgosi, operativum viðurskiftum og óhappum, myndugleikakrøvum, tøkni, fíggjarligum váða, kreditt- og gjaldførisváða.

Flogvinnan hevur lutfalsliga høgar flogútreiðslur knýttar at tí einstaka flogtúrinum, umframt høgar kapitalkostnaðir og aðrar fastar kostnaðir. Flogútreiðslurnar eru ikki beinleiðis ávirkaðar av ferðafólkatalinum í hvørjum flogfari. Tí hevur nýtslustigið, t.e. tali av ferðafólkum fyri hvønn túr, stóra ávirkan á vinningin fyri hvønn túr. Felagið fylgir neyvt við gongdini á nýtslustignum og miðalinntøkuni fyri at tryggja ein skynsaman rakstur.

### Brennievni

Útreiðslur til brennievni eru millum størstu útreiðslur í felagnum og hava sostatt stóra ávirkan á raksturin. Sveiggj í prísi á brennievni (jet fuel) kann ávirka brennievnisútreiðslur og rakstrarúrslit munandi. Útreiðslur til brennievni stóðu fyri 20% av samlaðu rakstrarútreiðslunum í 2019. Brennievni til flogfør verður avroknað í amerikanskum dollarum. Søguliga hava stórar broytingar verið í oljuprísinum og harvið ávirka raksturin ymiskt frá ári til ár.

Til tess at avmarka váðan, hevur nevnd felagsins samtykt ein prístryggingarpolitik. Prístryggingar verða keyptar í donskum krónum. Prístrygging avmarkar ávirkanina frá príshækkingum og príslækkingum. Sostatt fær felagið ein hægri brennievnisprís, tá ið heimsmarknaðarprísurin lækkar, og ein lægri brennievnisprís, tá ið heimsmarknaðarprísurin hækkar.

### CO2-útlát

Flogfeløg hava síðani 2012 verið partur av evropeisku CO2-útlátsskipanini „European Emission Trading Scheme,“ stytt EU ETS. Fyrstu tíðina fevndi skipanin um alla flúgving í ES og EFTA londum, umframt flúgving til og úr hesum londum. Seinni hevur ES avmarkað skipanina til bert at galda fyri flúgving í og millum ES og EFTA-lond, árini 2013 til og við 2023. Flúgving til og úr Føroyum er sostatt ikki fevnd av skipanini í løtuni, meðan flúgving felagsins í og millum ES og EFTA-lond, í høvuðsheitum leiguflúgving, kemur undir EU ETS skipanina.

Neyðugt er hjá felagnum at keypa CO2-kvotur, sonevnd útlátsloyvir, í sambandi við flúgving í ES og EFTA-londum. Felagið fær eisini avmarkaða kvotu ókeypis orsakað av søguligum rættindum. Marknaðurin fyri CO2-kvotur hevur søguliga verið óstøðugur. Seinastu tvey árini er prísurin á CO2-kvotum hækkaður úr 8 EUR/tCO2 upp í 25 EUR/tCO2.

Umframt EU ETS útlátsskipanina, verður flogferðsla eisini fevnd av CORSIA (Carbon Offsetting and Reduction Scheme for International Aviation), ið er altjóða marknaðarskipan fyri CO2-útlát frá altjóða flúgving. CORSIA skipanin byggir á, at vøkstur í útláti frá altjóða flogferðslu frá 2021 verður mótrokna við keypi av sonevndum „Carbon Offsettings“ (mótrokningarloyvum). Sambært CORSIA skipanini skal Atlantic Airways árini 2021 til og við 2029 keypa mótrokningarloyvi í tann mun, altjóða flogvinnan fer upp um útlátið í støðisárinum (miðal av útlátinum frá altjóða flúgving árini 2019 og 2020). Mótrokningin verður grundað á egið útlát í støðisárinum, faldað við prosentvøkstrinum í útláti frá altjóða flogvinnuni í mun til støðisárið. Eftir 2029 fer skipanin eisini at taka hædd fyri vøkstrinum í útlátinum hjá einstaka flogfelagnum. CORSIA skipanin fer næstu árini at vaksa um útreiðslur felagsins.

### Seinkingar og avlýsingar

Rakstur felagsins kann ávirkast av vánaligum veðurlíkindum (síðuvindi, turbulensi, mjørka, frosti og kava), øsku frá eldgosi og flogvallarseinkingum. Serstakliga føroyska veðurlagið kann tarna flogferðsluni til og úr Føroyum. Í 2019 hevði felagið 3,5 mió. kr. í útreiðslum orsakað av avlýsingum og seinkingum, samanborið við 1,9 mió. kr. í 2018. Harumframt verður rakstur felagsins ávirkaður av ES-lóggávu um endurgjald í ávísum førum í sambandi við seinkingar. Nýggja RNP AR 0.1 navigatiónsskipanin hjá felagnum hevur bøtt munandi um reglusemi og stundvísi og útreiðslur felagsins í sambandi við seinkingar og avlýsingar.

## 2.8 Váðastýring (Framhald)

### Gjaldoyraváði

Búskaparliga gongdin í felagnum kann ávirkast av broytingum í gjaldoyrakursum, serstakliga broytingum millum donsku krónuna og amerikanska dollaran. Útreiðslur til keyp og leigu av flogførum og trygging eins og meginparturin av viðlíkahaldi er í høvuðsheitum í amerikonskum dollarum. Ávísur partur av inntøkum og útreiðslum eru í bretskum pundum. Felagið metir um gjaldoyraváðan so hvørt, serliga millum donsku krónuna og amerikanska dollaran.

Felagið hevur prístryggingarpolitik, ið avmarkar váðan í sambandi við nýtslu av amerikanskum dollarum til leigu av flogførum.

### Rentuváði

Felagið kann ávirkast av rentuváða umvegis íløgur og fígging. Tann 31. desember 2019 var rentuberandi skuldin í felagnum 376 mió. kr. Meginparturin av rentuberandi skuldini er tryggjað við fastari rentu. Eginognin er framhaldandi stór í mun til fíggjarstøðuna. Solvensprosentið var 34 um ársskiftið.

### Gjaldsførisváði

Felagið hevur sum mál at hava hóskandi goymslu av gjaldføri, ið nøktar felagsins gjaldføristørv. Gjaldførið hjá konsernini 31. desember 2019 var 147 mió. kr. og verður mett at vera nøktandi. Tøkur peningur verður ávirkaður av árstíðarsveiggjum. Harumframt hevur felagið tilsøgn um upp til 30 mió. kr. í kreditti. Kredittur felagsins var óbrúktur tann 31. desember 2019.

### Kappingarstøða

Høvuðsinntøkukelda felagsins er rutuflúgving millum Føroyar og útheimin. Árini 2007–2017 var felagið einsamalt á Føroyaleiðini. Síðani mars 2017 hevur skandinaviska flogfelagið SAS eisini flogið regluliga millum Keypmannahavn og Vágar. Kappingarstøðan við yvirskotskapasiteti hevur ávirkað inntøkur og úrslit felagsins seinastu árini. Neilig ávirkan frá kappingarstøðuni á lønsemi felagsins væntast eisini í 2020.

## 2.9 Vitanarstøði

Vitanarstøðið í Atlantic Airways, serstakliga tilfeingi í starvsfólkahópinum, er avgerandi fyri kappingarføri felagsins. Felagið leggur stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í felagnum. Okkara mál er at útbúgva og varðveita okkara dugnaligu starvsfólk og vera fremsta val hjá dugnaligastu starvsfólkum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Felagið er tað einasta av sínum slag í Føroyum, og leggur tí dent á, at útbúgva og førleikamenna staðbundna arbeiðsmegi.

Umframt felagsins egnu innanhýsis ásetingar og krøv um útbúgving, førleikar og førleikamenning, áliggja felagnum eisini strong myndugleikakrøv um førleikamenning og viðlíkahald av førleikum hjá starvsfólki á flogdeildini, teknisku deildunum og í flogavgreiðsluni, umframt onnur starvsfólk, ið hava beinleiðis ábyrgd mótvegis flogmyndugleikum.

Umframt høgt vitanarstig á framleiðslusíðuni, leggur felagið eisini áherðslu á førleikar og førleikamenning innan fyrisiting og fyriskipan av flogfelagsrakstri, eitt nú innan góðsku, trygd, sølu, tænastu, fyriskipan og ráðlegging.



Mynd: Nicolás Vera-Ortiz

# 2.10 Frágreiðing um samfelagsábyrgd (CSR)

## Samfelagsábyrgd felagsins 2019

Atlantic Airways miðjar eftir at reka virksemið ábyrgdarfult, við gjøgnumskygni og leggur seg tí eftir at veita føroyska samfelagnum og ferðafólki kappingarførar tænastur, umframt at taka samfelagslig og umhvørvislig atlit.

Atlantic Airways er ein av størstu fyritøkunum í Føroyum við 194 ársverkum. Vit knýta Føroyar at umheiminum við rutuflúgving til Danmarkar, Íslands, Noregs, Bretlands, Fraklands, Spaniu og Kanarisku oyggjarnar, og ætlandi eisini til USA. Felagið hevur eisini avgerandi leiklut í menningini av ferðavinnu í Føroyum og rekur tyrluflúgving til útoyggjar og leiting og bjarging í føroyskum øki.

Tað er felagsins politikkur, at alt virksemi verður framt á ein slíkan hátt, at tikin verða vinnulig, samfelagslig og umhvørvislig atlit. Tí hava vit í hesi frágreiðing lýst tríggjar høvuðstættir:

- **Virkisrakstur**
  Heilsa & trygd, umhvørvi, trygdarstýring, compliance
- **Arbeiðsstaðurin**
  Starvsfólkanøgdsemi og trivnaður, útbúgving og førleikamenning
- **Samfelag**
  Saman menna vit Føroyar, sponsoravtalur og stuðul

## VIRKISRAKSTUR

### Umhvørvi

Í arbeiðsøki felagsins er brennievni til flogfør størsta árin, ið sett verður á umhvørvið. Flogvinnan er ógvuliga bundin at oljunýtslu og harvið eisini $CO_2$-útláti, ið hildið verður er orsøk til veðurlagsbroytingar. Við stórum útreiðslum til brennievni er skilagott, bæði vinnuliga og umhvørvisliga, at stremba eftir at minka um oljunýtslu og $CO_2$-útlát.

Felagið endurnýggjaði fyri nøkrum árum síðani flotan við Airbus flogførum ístaðin fyri gomlu Avro RJ flogførini, ið høvdu hægri útlát. Í 2019 varð hildið áfram við at endurnýggja flotan, tá ið fyrsta Airbus A320neo flogfarið kom í flotan. Í tíðarskeiðnum 2020–2024 verða trý Airbus A320neo flogfør afturat latin felagnum. A320neo flogførini hava í minsta lagi 15% lægri oljunýtslu og $CO_2$ útlát enn verandi Airbus flogfør. Í 2019 var miðal brennievnisnýtslan fyri hvørt ferðafólk í rutuflúgving 21 kilo lægri samanborið við miðal brennievnisnýtsluna í 2008. Umroknað til $CO_2$-útlát er útlátið fyri hvørt ferðafólk lækkað við 66 kg av $CO_2$, ella 34%. Í 2019 var samlaða $CO_2$-útláti frá rutuflúgvingini hjá Atlantic Airways 44.273 tons. Í sambandi við umhvørviskrøv frá ES-myndugleikum, hevur Atlantic Airways síðani 2010 skrásett alla brennievnisnýtslu og $CO_2$-útlát frá flogførum.

Oljunýtsla fyri hvørt ferðafólk, rutuflúgving (Kilo/Ferðafólk)



# 2.10 Frágreiðing um samfelagsábyrgd (CSR) (Framhald)

Í mun til fyrr verða flogførini vaskað oftari enn áður, tí eitt reint flogfar brúkar minni av brennievni. Somuleiðis er borðbúnaður og íløt umborð á flogførunum skift út við burðardyggar loysnir. Felagið arbeiðir áhaldandi við at menna burðardyggar loysnir á øllum økjum, ið kunnu betri um umhvørvisárini.

Harumframt eru vit fullgreið yvir okkara umhvørvisávirkan viðvíkjandi nýtsluni av kemiskum evnum og eiturevnum. Hesi eru kravd til viðlíkahald av flogførum. Tó gera vit alt fyri at avmarka okkara nýtslu so nógv sum gjørligt. Vit hava eisini serligar mannagongdir fyri burturbeining av eiturevnum. Burturkast verður skilt í burturkast at brenna, burturkast at endurnýta (pappír), brennievni, smyrjioljur og lívrunnið tilfar, og hesi verða so endurnýtt ella burturbeind á ein skipaðan hátt fyri at minka skaða á umhvørvið.

## Heilsa og trygd

Tað er av alstórum týdningi fyri okkara rakstrarloyvi, at vit fylgja øllum lógar- og vinnukrøvum, tá tað snýr seg um heilsu og trygd. Harumframt verður áhaldandi dentur lagdur á verju av heilsu og trygd hjá starvsfólki, og somuleiðis verður skipað fyri upplæring innan økið.

Allir skaðatilburðir, ella arbeiðsskaðar, verða eftirmettir og tiltøk sett í verk til tess at forða fyri, at hendingarnar ikki fara fram aftur.

## Trygdarstýring

Trygdarstýring er ein skipaður háttur at stýra váðum og minka/beina burtur trygdarváðar, bæði í tí rakstrarliga og tekniska umhvørvinum. Hendan framsøkna trygdarmannagongd er sett í verk í felagnum, so fráboðaðar hendingar verða kannaðar fyri at fáa møgulig brot fram í ljósmála, og neyðug stig kunnu setast í verk at forða fyri endurtøku. Endamálið er at flokka allar váðar, fráboða allar hendingar, meta um avleiddar váðar og minka teir so nógv sum gjørligt („As low as reasonably practicable," stytt ALARP).

Umframt at eggja hvørjum einstøkum starvsfólki at fráboða allar hendingar og møguligar vandar, inniheldur skipanin eina rættvísa trygdarmentan „Just Safety Culture," sum inniber, at fráboðarin ella annar persónur ikki verður revsaður fyri nakað, ið annars ikki vildi komið fram í ljósmála.

Umframt rakstrarfráboðanarskipanina, er Flight Data Monitoring (FDM) eisini alneyðugt fyri flogferðsluna. FDM-hagtøl gera, at vit eru før fyri at eyðmerkja møguligar vandar, ið liggja uttan fyri rakstrarmannagongdir. Út frá hagtølum og gongdini í hesum dáta, kunnu vit síggja og spáa um, hvar vit skulu leggja størri dent á.

Í tekniska umhvørvinum verður stórur dentur lagdur á at læra av mistøkum og minka um mistøk av mannaávum, ið seta trygdina í rakstrarumhvørvinum í vanda. Hetta verður skipað umvegis skipanina, Maintenance Error Management System (MEMS). Í hesi skipan verða hendingar skrásettar og kannaðar til tess at læra av gjørdum mistøkum.

Eftir nógv ár við fráboðanum og kanningum hevur felagið staðfest fimm lyklaatburðir, sonevndar „Key Behaviours," í tekniska viðlíkahaldsarbeiðnum, ið økja um trygdina.

Hesir lyklaatburðir eru:

- **Far ígjøgnum viðlíkahaldkunningina**
  (áðrenn byrjað verður)
- **Skráset arbeiðsgongd**
  (fyri at tryggja, at næsta vakt veit júst, hvat er gjørt)
- **Serskilt eftirlit**
  (eftir at stórar uppgávur eru framdar)
- **Hav eyguni eftir gjørda arbeiðnum einaferð enn**
  (eftir at uppgávan er gjørd fyri at vera fullvís í, at flogfarið kann fara á flog)
- **Hugsa gjølla um uppgávuna**
  (áðrenn farið verður í gongd við kritiska ella krevjandi uppgávu)

## Compliance (reglustýring)

Compliance snýr seg um skyldu felagsins at tryggja, at øll flúgving og alt viðlíkahald av flogførum og tyrlum verður framt, samsvarandi øllum lógarkrøvum, kravsetingum, tilráðingum og felagsins egnu ásetingum. Grundarlagið undir compliance stýringini er góðskupolitikkur felagsins.

Fýra ferðir árliga metir stjórnin um, hvussu gongur við compliance stýringini. Eftirmetingin er bygd á lyklavísitøl (Key Performance Indicators) úr øllum deildum, umframt óheftar góðskutrygdarfrágreiðingar frá innanhýsis og uttanhýsis eftirlitisfólki, íroknað eftirlitisfólki frá flogmyndugleikum.

# 2.10 Frágreiðing um samfelagsábyrgd (CSR) (Framhald)

## ARBEIÐSPLÁSS

### Starvsfólkanøgdsemi og trivnaður

Atlantic Airways, ið er ein av stóru arbeiðsgevarunum í Føroyum, bjóðar starvsfólki altjóða yrkisleið við høgum førleikakrøvum í áhugaverdari vinnu.

Atlantic Airways leggur stóran dent á starvsfólkanøgdsemi og trivnað. Ásannað verður, at nøgd og eldhugað starvsfólk eru meira virkin og munadygg í dagliga yrki sínum. Í 2018 varð kanning gjørd av arbeiðsumhvørvinum á øllum deildum í felagnum, bæði av sálarliga arbeiðsumhvørvinum og beinleiðis umhvørvinum á arbeiðsstaðnum. Kanningin vísti, at starvsfólkanøgdsemið er høgt. Sum úrslit av kanningini verða ætlanir lagdar um batar á lyklaøkjum, har tað verður mett neyðugt.

Vit stremba eftir at verða eitt arbeiðspláss, ið røkkur longur enn einans til vanligar starvssetanir. Tí samstarva vit eisini við Arbeiðsloysisskipanina við tí fyri eyga at bjóða arbeiðsleysum starvsmøguleikar og útbúgving, har tað letur seg gera. Harumframt hava vit altíð fólk í tillagaðum størvum í samstarvi við Almannastovuna – annaðhvørt í føstum ella fyribils starvi. Tá neyðugt er at siga fólk úr starvi, gera vit alt, vit eru før fyri at hjálpa fólki víðari á yrkisleiðini.

### Útbúgving

Felagið er tað einasta av sínum slag í Føroyum og leggur tí dent á, at útbúgva og førleikamenna staðbundna arbeiðsmegi og samstundis tryggja felagnum burðardygga arbeiðsmegi. Vit meta tað sum kjarnuábyrgd at menna nýggj talent á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Í einum lítlum samfelag sum tí føroyska er umráðandi at skapa góð livikor fyri ungdómin, so flestu teirra leita aftur til Føroya eftir lokna útbúgving uttanlands. Vit bjóða fleiri útbúgvingarmøguleikar og samstarva við føroysk lesandi.

Í 2019:

- lótu vit dyrnar upp fyri fleiri enn 20 fólkaskúlanæmingum í starvsvenjing
- bjóðaðu vit føroyskum lesandi, heima og úti, stutttíðarstørv í háárstíð sum flogternur, umframt onnur tænastustørv
- givið fleiri ungum føroyskum flogskiparum Airbus type-rating

### Førleikamenning

Vit leggja sera stóran dent á førleikamenning av starvsfólki okkara. Okkara mál er at útbúgva og varðveita okkara dugnaligu starvsfólk og vera fremsta val hjá dugnaligastu starvsfólkum á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Førleikamenning tryggjar framhaldandi menning av hvørjum einstøkum starvsfólki og hevur jaliga ávirkan á starvsfólkanøgdsemi.

Førleikamenning okkara er sett saman av kravdari útbúgving og viðlíkahaldi av førleikum hjá starvsfólki, umframt aðrari førleikamenning ásett av felagum. Í 2019 hevði felagið 5,2 mió. kr. í útreiðslum til kravda og aðra førleikamenning.

# 2.10 Frágreiðing um samfelagsábyrgd (CSR) (Framhald)

## SAMFELAG

### Saman menna vit Føroyar

Sum virkin luttakari í føroyska samfelagnum er Atlantic Airways til fyri at knýta Føroyar at umheiminum og fyri at knýta oyggjarnar saman og skapa tryggleika. Felagið flýgur fyri Føroyar við einum regluligum, smidligum og fjølbroyttum rutuneti og tænastum við kappingarførum prísum. Samskapað verður við kundar og samfelag um tænastur og upplivingar. Góða rutunetið ger, at okkara ferðandi, ung & eldri, sterk & veik, fólk & farmur, kunnu ferðast til vinnu & mentan, gaman & álvara og í gleði & sorg. Fyri okkum er av alstórum týdningi, at tað eru góð livikor at liva og virka í Føroyum. Tí hava vit áhaldandi samband við lokalar áhugabólkar fyri at finna loysnir og hugskot til, hvussu vit kunnu bøta um tænastur og útboð.

Vit taka eisini virknan lut í menningini av føroyska arbeiðsmarknaðinum umvegis limaskap í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Ein sterkur føroyskur arbeiðsmarknaður skapar búskaparligt virksemi og størv í Føroyum, umframt skapar flutningsstørv til og úr Føroyum.

Atlantic Airways tekur somuleiðis virknan lut í menningini av altjóða brandingini av Føroyum uttanlands, tí vit síggja stórar vakstrarmøguleikar í føroyskari ferðavinnu, samstundis sum ferðavinnan eisini hevur vaksandi samfelagsbúskaparligan týdning.

### Sponsor-avtalur og stuðul

Sum virkin luttakari í samfelagnum stuðlar felagið føroyskum ítrótti og mentan, tí vit halda, at samfelagið eigur at hava eitt sunt mentanar- og ítróttarlív.

Innan ítrótt stuðla vit landsliðum og ítróttarsambondum heldur enn lokalum liðum, eins og vit vilja lívga um góð talent, sum kunnu gera vart við seg og Føroyar uttanlands. Felagið hevur verið høvuðsstuðul hjá landsliðnum í fótbólti síðani 1995. Atlantic Airways stuðlar eisini landsliðunum í hondbólti, flogbólti, svimjing og talvi. Avtalað er eisini við Ítróttarsamband Føroya um at stuðla smærri ítróttarsambondum í altjóða høpi.

Atlantic Airways stuðlar eisini mentan og tónleikafestivalum. Í samstarvi við Norðurlandahúsið, Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið hevur Atlantic Airways stovnað Loftbrúnna, ið veitir stuðul til flogferðir til listafólk í sambandi við mentanartiltøk uttanlands.

Í 2016 setti Atlantic Airways á stovn stuðulsskipanina, Listaflog, hvørs endamál er at stuðla føroyskari list fíggjarliga og við ferðaseðlum á rutunetinum hjá felagnum í sambandi við listaligt arbeiði og/ella ávísa listaverkætlan. Stuðulin, ið er 100.000 kr. um árið, verður latin eina ferð árliga, nevniliga tann 28. mars, ið er dagurin, Atlantic Airways fór á flog fyri fyrstu ferð.

# 3.1 Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram konsern- og ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2019 hjá P/F Atlantic Airways.

Konsern- og ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2019 hjá konsernini og felagnum og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2019.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísa frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Konsern- og ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Sørvágur, hin 12. mars 2020.

**Stjórn:**

| | |
|---|---|
| Jóhanna á Bergi<br>*Forstjóri* | Marius Davidsen<br>*Fíggjarstjóri* |

**Nevnd:**

| | | |
|---|---|---|
| Niels Mortensen<br>*Formaður* | Kaj Johannessen<br>*Næstformaður* | Laila Hentze |
| Fróði Magnussen | Eystein í Løðu | Johan Vágadal |

Ársfrásøgnin er góðkend á ársaðalfundi tann:

Fundarstjóri:



Mynd: Nicolás Vera-Ortiz

# 3.2 Átekning frá óheftum grannskoðara

## TIL LEIÐSLUNA Í P/F ATLANTIC AIRWAYS

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað konsernroknskapin og ársroknskapin hjá Atlantic Airways P/F fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2019 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognar-uppgerð og notum, undir hesum nýttur roknskaparháttur fyri bæði konsernina og felagið umframt pengastreymsuppgerð fyri konsernina. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2019 hjá konsernini og felagnum, av úrslitinum av virkseminum hjá konsernini og felagnum umframt av pengastreymunum hjá konsernini í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2019 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti „Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin". Vit eru óheft av konsernini samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av konsernroknskapinum og ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein konsernroknskap og ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at konsernroknskapurin og ársroknskapurin kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá konsernroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera konsernroknskapin og ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka konsernina ella felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

### Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin í síni heild ikki hava týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í konsernroknskapinum og ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt konsernroknskapin og ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í konsernroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at konsernin og felagið ikki longur megna at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í konsernroknskapurin og ársroknskapin, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um konsernroknskapurin og ársroknskapurin vísa tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

- Fáa hóskandi og egnað grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum um fyritøkur ella handilsvirksemi í konsernini til tess at røkka eina niðurstøðu um konsernroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og at gera konserngrannskoðanina. Vit hava evstu ábyrgdina av grannskoðanarniðurstøðuni.og at gera konserngrannskoðanina. Vit hava evstu ábyrgdina av grannskoðanarniðurstøðuni.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um konsernroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av konsernroknskapinum og ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 12. mars 2020

**P/F JANUAR**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

Heini Thomsen
Statsaut. revisor

# 4.1 Rakstrarroknskapur 2019

| | | Konsern | | Atlantic Airways | |
|---|---|---|---|---|---|
| **(Kr. 1.000)** | **Nota** | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** |
| Nettosøla | | 570.692 | 545.896 | 570.692 | 545.896 |
| Onnur inntøka | | 3.625 | 980 | 3.625 | 980 |
| **Inntøkur tilsamans** | | **574.317** | **546.876** | **574.317** | **546.876** |
| Rakstrarkostnaður | | -379.749 | -349.304 | -379.303 | -349.304 |
| Starvsfólkakostnaður | 3 | -126.356 | -114.046 | -126.132 | -114.046 |
| Rakstrarútreiðslur tils. | | -506.106 | -463.350 | -505.435 | -463.350 |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar (EBITDA)** | | **68.211** | **83.526** | **68.882** | **83.526** |
| | | | | | |
| Av- og niðurskrivingar | 4, 8, 9 | -54.731 | -58.388 | -54.731 | -58.388 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar (EBIT)** | | **13.480** | **25.137** | **14.151** | **25.137** |
| | | | | | |
| Fíggjarinntøkur | 5 | 611 | 45 | 195 | 45 |
| Fíggjarútreiðslur | | -13.516 | -13.007 | -13.377 | -13.007 |
| Úrslit frá atknýttum feløgum | 11 | 0 | 0 | -323 | 0 |
| Úrslit frá assioc. feløgum | 12 | 8.904 | 7.583 | 8.904 | 7.583 |
| **Fíggjarpostar netto** | | **-4.001** | **-5.380** | **-4.601** | **-5.380** |
| **Úrslit áðrenn skatt (EBT)** | | **9.479** | **19.758** | **9.550** | **19.758** |
| | | | | | |
| Skattur | 7 | -1.648 | -3.556 | -1.719 | -3.556 |
| **Ársúrslit** | | **7.831** | **16.201** | **7.831** | **16.201** |
| | | | | | |
| **Býti av ársúrsliti** | | | | | |
| Flutt frá undanfarnum ári | | 149.868 | 135.250 | 149.868 | 135.250 |
| Ársúrslit | | 7.831 | 16.201 | 7.831 | 16.201 |
| **Tilsamans** | | **157.699** | **151.451** | **157.699** | **151.451** |
| | | | | | |
| **Verður skotið upp at býta soleiðis:** | | | | | |
| Flutt til tiltakspening av nettouppskriv. eftir innara virðishátti | | 1.904 | 1.583 | 1.904 | 1.583 |
| At flyta fram til næsta ár | | 155.795 | 149.868 | 155.795 | 149.868 |
| **Tilsamans** | | **157.699** | **151.451** | **157.699** | **151.451** |

# 4.2 Fíggjarstøða pr. 31. desember 2019

| | | Konsern | | Atlantic Airways | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ogn (Kr. 1.000)** | **Nota** | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** |
| | | | | | |
| **Immateriell støðisogn tilsamans** | **8** | **3.690** | **4.952** | **3.202** | **4.952** |
| | | | | | |
| Flogfør og viðlíkahald | 9 | 483.362 | 523.421 | 483.362 | 523.421 |
| Eykalutir | 9 | 1.689 | 1.929 | 1.689 | 1.929 |
| Rakstrargøgn | 9 | 21.761 | 18.308 | 18.560 | 18.308 |
| Hangarur, bygningar og grundøki | 9 | 24.468 | 26.429 | 24.468 | 26.429 |
| Forútgjøld til keyp av flogførum | 10 | 7.672 | 0 | 7.672 | 0 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | **538.952** | **570.087** | **535.752** | **570.087** |
| | | | | | |
| Íløgur í atknýtt feløg | 11 | 0 | 0 | 24.677 | 25.000 |
| Íløgur í associerað feløg | 12 | 16.543 | 14.640 | 13.343 | 11.440 |
| Onnur virðisbrøv | 13 | 242 | 242 | 242 | 242 |
| Ábyrgdarlán | | 12.800 | 12.800 | 0 | 0 |
| **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | | **29.585** | **27.681** | **38.262** | **36.681** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **572.227** | **602.720** | **577.216** | **611.720** |
| | | | | | |
| **Goymsla** | | **212** | **294** | **212** | **294** |
| | | | | | |
| Vøru- og tænastuáogn | | 15.424 | 16.717 | 15.424 | 16.717 |
| Áogn hjá atknýttum feløgum | | 0 | 0 | 4.734 | 961 |
| Tíðaravmarkingar | 14 | 1.608 | 1.881 | 1.608 | 895 |
| Onnur áogn | 15 | 21.572 | 14.067 | 20.726 | 14.067 |
| Onnur partabrøv | | 27 | 27 | 27 | 27 |
| Skattaáogn | 6 | 71 | 0 | 0 | 0 |
| Avleidd fíggjarlig amboð | 16 | 3.461 | 809 | 3.461 | 809 |
| **Áogn tilsamans** | **17** | **42.162** | **33.502** | **45.979** | **33.477** |
| | | | | | |
| **Tøkur peningur** | | **150.880** | **156.686** | **142.074** | **147.711** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **193.254** | **190.482** | **188.266** | **181.482** |
| | | | | | |
| **Aktiv tilsamans** | | **765.482** | **793.201** | **765.482** | **793.201** |

# 4.2 Fíggjarstøða pr. 31. desember 2019 (Framhald)

| Skyldur (Kr. 1.000) | Nota | Konsern 2019 | Konsern 2018 | Atlantic Airways 2019 | Atlantic Airways 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 22 | 103.500 | 103.500 | 103.500 | 103.500 |
| Grunnur fyri uppskrivingar | 22 | 1.640 | 1.640 | 1.640 | 1.640 |
| Virðisjavnan av avl. fíggjarligum amboðum | 22 | -13.854 | -22.605 | -13.854 | -22.605 |
| Tiltakspeningur av nettouppskr. eftir innanvirðishátti | 22 | 11.549 | 9.645 | 11.549 | 9.645 |
| Flutt úrslit | 22 | 155.795 | 149.868 | 155.795 | 149.868 |
| Tilmælt vinningsbýti | 22 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Eginogn tilsamans** | | **258.630** | **242.047** | **258.630** | **242.047** |
| Avsett til útsettan skatt | 7 | 45.519 | 41.879 | 45.519 | 41.879 |
| **Avsetingar tilsamans** | | **45.519** | **41.879** | **45.519** | **41.879** |
| Veðlán | 19 | 344.743 | 375.494 | 344.743 | 375.494 |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **344.743** | **375.494** | **344.743** | **375.494** |
| Veðlán | 19 | 31.096 | 31.096 | 31.096 | 31.096 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 19.649 | 26.332 | 19.649 | 26.332 |
| Partafelagsskattur | 7 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Forútgjøld og tíðaravmarkingar | 18 | 65.679 | 67.821 | 65.679 | 67.821 |
| Avleidd fíggjarlig amboð | 16 | 166 | 8.532 | 166 | 8.532 |
| **Stuttfreista skuld tilsamans** | | **116.590** | **133.781** | **116.590** | **133.781** |
| **Skuld tilsamans** | | **506.852** | **551.154** | **506.852** | **551.154** |
| **Eginogn og skyldur tilsamans** | | **765.482** | **793.201** | **765.482** | **793.201** |
| Veðsetingar og møguligar skyldur v.m. | 20 | | | | |

# 4.3 Frágreiðing um eginogn

| (Kr. 1.000) | Partapeningur | Grunnur fyri uppskrivingar | Virðisj. av avl. fíggj. amb. | Tiltakspen. av nettouppskriv. eftir innara virðishátti | Fluttur vinningur | Tilmælt vinningsbýti | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Konsern | | | | | | |
| **Eginogn 01.01.2018** | **103.500** | **-** | **-14.427** | **8.062** | **135.250** | **-** | **232.384** |
| Ársúrslit | - | - | - | - | 16.201 | - | 16.201 |
| Grunnur fyri uppskrivingar | - | 1.640 | - | - | | - | 1.640 |
| Virðisj. av avl. fíggj. amb. | - | - | -8.178 | - | - | - | -8.178 |
| Tiltakspen. av nettouppskriv. eftir innara virðishátti | - | - | - | 1.583 | -1.583 | - | - |
| Tilmælt vinningsbýti | - | - | - | - | - | - | - |
| Útgoldið vinningsbýti | - | - | - | - | - | - | - |
| **Eginogn 31.12.2018** | **103.500** | **1.640** | **-22.605** | **9.645** | **149.868** | **-** | **242.047** |
| | | | | | | | |
| **Eginogn 01.01.2019** | **103.500** | **1.640** | **-22.605** | **9.645** | **149.868** | **-** | **242.047** |
| Ársúrslit | - | - | - | - | 7.831 | - | 7.831 |
| Grunnur fyri uppskrivingar | - | - | - | - | - | - | - |
| Virðisj. av avl. fíggj. amb. | - | - | 8.752 | - | - | - | 8.752 |
| Tiltakspen. av nettouppskriv. eftir innara virðishátti | - | - | - | 1.904 | -1.904 | - | - |
| Tilmælt vinningsbýti | - | - | - | - | - | - | - |
| Útgoldið vinningsbýti | - | - | - | - | - | - | - |
| **Eginogn 31.12.2019** | **103.500** | **1.640** | **-13.854** | **11.549** | **155.795** | **-** | **258.630** |

Ongar broytingar eru í partapeninginum.

# 4.3 Frágreiðing um eginogn

| (Kr. 1.000) | Atlantic Airways<br>Parta-peningur | Grunnur fyri upp-skrivingar | Virðisj. av avl. fíggj. amb. | Tiltakspen. av nettoupp-skriv. eftir innara virðishátti | Fluttur vinningur | Tilmælt vinnings-býti | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 01.01.2018** | **103.500** | **-** | **-14.427** | **8.062** | **135.250** | **-** | **232.384** |
| Ársúrslit | - | - | - | - | 16.201 | - | 16.201 |
| Grunnur fyri uppskrivingar | - | 1.640 | - | - | | - | 1.640 |
| Virðisj. av avl. fíggj. amb. | - | - | -8.178 | - | - | - | -8.178 |
| Tiltakspen. av nettouppskriv. eftir innara virðishátti | - | - | - | 1.583 | -1.583 | - | - |
| Tilmælt vinningsbýti | - | - | - | - | - | - | - |
| Útgoldið vinningsbýti | - | - | - | - | - | - | - |
| **Eginogn 31.12.2018** | **103.500** | **1.640** | **-22.605** | **9.645** | **149.868** | **-** | **242.047** |
| | | | | | | | |
| **Eginogn 01.01.2019** | **103.500** | **1.640** | **-22.605** | **9.645** | **149.868** | **-** | **242.047** |
| Ársúrslit | - | - | - | - | 7.831 | - | 7.831 |
| Grunnur fyri uppskrivingar | - | - | - | - | - | - | - |
| Virðisj. av avl. fíggj. amb. | - | - | 8.752 | - | - | - | 8.752 |
| Tiltakspen. av nettouppskriv. eftir innara virðishátti | - | - | - | 1.904 | -1.904 | - | - |
| Tilmælt vinningsbýti | - | - | - | - | - | - | - |
| Útgoldið vinningsbýti | - | - | - | - | - | - | - |
| **Eginogn 31.12.2019** | **103.500** | **1.640** | **-13.854** | **11.549** | **155.795** | **-** | **258.630** |

Ongar broytingar eru í partapeninginum.

# 4.4 Peningastreymsfrágreiðing

| | | Konsern | |
|---|---|---|---|
| **(Kr 1.000)** | **Nota** | **2019** | **2018** |
| **Ársúrslit** | | **7.831** | **16.201** |
| Av- og niðurskrivingar | | 54.731 | 58.388 |
| Skattur | | 1.648 | 3.556 |
| **Reguleringar** | | **56.379** | **61.945** |
| +/- vøru- og tænastuáogn | | 1.294 | -668 |
| +/- tíðaravmarkingar | | 248 | 141 |
| +/- onnur áogn | | -7.505 | -3.207 |
| +/- goymsla | | 82 | -83 |
| +/- íløgur í associerað feløg og onnur virðisb. | | -1.904 | -1.545 |
| +/- vøru- og tænastuskuld | | -6.683 | 2.953 |
| +/- onnur skuld og tíðaravmarkingar | | -2.117 | 3.133 |
| **Broyting í rakstrarpeningi** | | **-16.585** | **722** |
| **Peningsstreymur frá rakstri** | | **47.625** | **78.868** |
| Keyp av im- og materiellari støðisognum | 8, 9 | -27.404 | -14.327 |
| Íløga í fíggjarliga støðisogn | 11 | 0 | -16.000 |
| Søla av im- og materiellari støðisognum | 8, 9 | 5.068 | 521 |
| **Peningastreymur frá íløguvirksemi** | | **-22.335** | **-29.807** |
| Avdráttur veðskuld | | -31.096 | -31.096 |
| **Peningastreymur av fíggjarvirksemi** | | **-31.096** | **-31.096** |
| **Peningastreymar tilsamans fyri tíðarskeiðið** | | **-5.806** | **17.965** |
| Gjaldførið primo | | 156.686 | 138.721 |
| **Gjaldførið við ársenda** | | **150.880** | **156.686** |

Felagið hevur afturat tøka peninginum tilsøgn um kassakreditt uppá DKK 30 mill.

# 4.5 Yvirlit yvir notur

1. Segment býti
2. Útgreining av ferðafólkatali
3. Starvsfólkakostnaður
4. Av- og niðurskrivingar
5. Fíggjarinntøkur
6. Grannskoðara samsýning
7. Skattur
8. Immateriell støðisogn
9. Materiell støðisogn
10. Forútgjøld flogfør
11. Íløgur í atknýtt feløg
12. Íløgur í associerað feløg
13. Onnur virðisbrøv
14. Tíðaravmarkingar
15. Onnur áogn
16. Avleidd fíggjarlig amboð
17. Áogn
18. Forútgjøld og tíðaravmarkingar
19. Langfreistað skuld
20. Veðsetingar og møguligar skyldur v.m.
21. Nærskildir partar
22. Eginogn
23. Hendingar eftir roknskaparlok
24. Nýttur roknskaparháttur

# 4.6 Notur

ATLANTIC AIRWAYS

| 1. Segmentbýti | Flogfør | | Tyrlur | | Felagið tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **(Kr. 1.000)** | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** |
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | | |
| Nettosøla | 520.949 | 497.679 | 49.743 | 48.217 | 570.692 | 545.896 |
| Onnur inntøka | 3.625 | 980 | 0 | 0 | 3.625 | 980 |
| **Inntøka tilsamans** | **524.574** | **498.659** | **49.743** | **48.217** | **574.317** | **546.876** |
| Rakstrarkostnaður | 513.664 | 475.996 | 46.502 | 45.742 | 560.166 | 521.738 |
| **Rakstrarúrslit** | **10.910** | **22.663** | **3.240** | **2.475** | **14.151** | **25.137** |
| | | | | | | |
| Ávirkan frá associeraðum feløgum | - | - | - | - | -323 | 0 |
| Fíggjarinntøkur | 195 | 45 | 0 | 0 | 195 | 45 |
| Fíggjarútreiðslur | -8.760 | -8.091 | -4.617 | -4.916 | -13.377 | -13.007 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **2.346** | **14.616** | **-1.377** | **-2.441** | **9.550** | **19.758** |
| Skattur | - | - | - | - | -1.719 | -3.556 |
| **Úrslit** | | | | | **7.831** | **16.201** |

| Geografisk virkisøkir | Føroyar | | Europa | | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoinntøkan stavar frá hesum marknaðum: | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** |
| **Inntøka tilsamans** | **290.218** | **271.911** | **284.098** | **274.965** | **574.317** | **546.876** |

| 2. Útgreining av ferðafólkatali | Atlantic Airways | |
|---|---|---|
| | **2019** | **2018** |
| Ferðafólk flogfør, ruta | 338.183 | 307.533 |
| Ferðafólk flogfør, leigutúrar | 107.456 | 129.025 |
| **Ferðafólk flogfør** | **445.639** | **436.558** |
| Ferðafólk tyrlur | 14.541 | 12.939 |
| **Ferðafólk tilsamans** | **460.180** | **449.497** |
| | | |
| **Blokktímar** | | |
| Flogfør, ruta | 6.213 | 5.633 |
| Flogfør, leigutúrar | 2.617 | 2.943 |
| **Flúgvitímar flogfør** | **8.830** | **8.576** |
| Tyrlur | 906 | 887 |
| **Flúgvitímar tilsamans** | **9.736** | **9.463** |
| | | |
| **Uttanlanda inntøka** | | |
| Útflutningsvirði (Kr. 1.000) | 284.098 | 274.965 |
| Útflutningsvirði í % | 50% | 50% |

ATLANTIC AIRWAYS

| 3. Starvsfólkakostnaður (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Konsern 2018 | Atlantic Airways 2019 | Atlantic Airways 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Lønir | -110.785 | -101.474 | -110.730 | -101.474 |
| Eftirlønargjøld | -10.096 | -8.376 | -9.970 | -8.376 |
| Gjald til almennar tryggingar | -5.475 | -4.197 | -5.432 | -4.197 |
| Bonus | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **-126.356** | **-114.046** | **-126.132** | **-114.046** |
| | | | | |
| **Samsýning til stjórn og nevnd** | | | | |
| **Stjórn** | | | | |
| Jóhanna Á Bergi, CEO, løn | -1.218 | -1.218 | -1.218 | -1.218 |
| Jóhanna Á Bergi, CEO, eftirløn | -180 | -180 | -180 | -180 |
| Jóhanna Á Bergi, CEO, bonus | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Marius Davidsen, CFO, løn | -1.035 | -1.035 | -1.035 | -1.035 |
| Marius Davidsen, CFO, eftirløn | -153 | -153 | -153 | -153 |
| Marius Davidsen, CFO, bonus | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | | | | |
| **Nevnd** | | | | |
| Niels Mortensen, Formaður, løn | -260 | -260 | -260 | -260 |
| Kaj Johannesen, Næstformaður, løn | -240 | -240 | -240 | -240 |
| Laila Hentze, løn | -140 | -140 | -140 | -140 |
| Fróði Magnussen, løn | -140 | -140 | -140 | -140 |
| Hanna Svabo, løn | -35 | -140 | -35 | -140 |
| Janus Rein, løn | 0 | -93 | 0 | -93 |
| Jóhan Mikkelsen, løn | -35 | -47 | -35 | -47 |
| Jóhan Vágadal, løn | -105 | 0 | -105 | 0 |
| Eystein í Løðu, løn | -105 | 0 | -105 | 0 |
| **Tilsamans** | **-3.646** | **-3.646** | **-3.646** | **-3.646** |
| | | | | |
| *Tal av starvsfólki* | *195* | *184* | *194* | *184* |

| 4. Av- og niðurskrivingar (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Konsern 2018 | Atlantic Airways 2019 | Atlantic Airways 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Avskrivingar, immmateriell støðisogn | -2.140 | -1.933 | -2.140 | -1.933 |
| Avskrivingar, materiell støðisogn | -52.591 | -56.455 | -52.591 | -56.455 |
| Niðurskrivingar, materiell støðisogn | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Av- og niðurskrivingar tilsamans** | **-54.731** | **-58.388** | **-54.731** | **-58.388** |

| 5. Fíggjarinntøkur (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Konsern 2018 | Atlantic Airways 2019 | Atlantic Airways 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Fíggjarinntøkur, atknýttar fyritøkur | 0 | 0 | 64 | 0 |
| Aðrar fíggjarinntøkur | 611 | 45 | 132 | 45 |
| **Fíggjarinntøkur tilsamans** | **611** | **45** | **195** | **45** |

| 6. Grannskoðara samsýning (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Konsern 2018 | Atlantic Airways 2019 | Atlantic Airways 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Grannskoðan | -125 | -125 | -125 | -125 |
| Onnur arbeiði | -62 | -110 | -62 | -110 |
| **Tilsamans** | **-187** | **-235** | **-187** | **-235** |

| 7. Skattur (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Konsern 2018 | Atlantic Airways 2019 | Atlantic Airways 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Beinleiðis skattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Broyting av útsettum skatti í árinum | -1.648 | -3.556 | -1.719 | -3.556 |
| **Skattur tilsamans** | **-1.648** | **-3.556** | **-1.719** | **-3.556** |
| | | | | |
| Útsettur skattur 1. januar | 41.879 | 39.758 | 41.879 | 39.758 |
| Broyting av útsettum skatti í árinum | 1.790 | 3.556 | 1.719 | 3.556 |
| Skattur innroknaður í eginognina | 1.921 | -1.435 | 1.921 | -1.435 |
| **Útsettur skattur ultimo** | **45.590** | **41.879** | **45.519** | **41.879** |

| 8. Immateriell støðisogn (Kr. 1.000) | Konsern Ritbúnaður | Konsern Tilsamans |
|---|---|---|
| Útveganarvirðið 1. januar | 19.316 | 19.316 |
| Tilgongd í árinum | 878 | 878 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | **20.194** | **20.194** |
| | | |
| Av- og niðurskrivingar 1. januar | -14.364 | -14.364 |
| Avskrivingar í árinum | -2.140 | -2.140 |
| Avskr. viðv. frágongd í árinum | 0 | 0 |
| **Avskrivingar 31. desember** | **-16.504** | **-16.504** |
| | | |
| **Bókað virði 31. desember 2019** | **3.690** | **3.690** |
| | | |
| *Bókað virði 31. desember 2018* | *4.952* | *4.952* |

| (Kr. 1.000) | Atlantic Airways Ritbúnaður | Atlantic Airways Tilsamans |
|---|---|---|
| Útveganarvirðið 1. januar | 19.316 | 19.316 |
| Tilgongd í árinum | 390 | 390 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | **19.706** | **19.706** |
| | | |
| Av- og niðurskrivingar 1. januar | -14.364 | -14.364 |
| Avskrivingar í árinum | -2.140 | -2.140 |
| Avskr. viðv. frágongd í árinum | 0 | 0 |
| **Avskrivingar 31. desember** | **-16.504** | **-16.504** |
| | | |
| **Bókað virði 31. desember 2019** | **3.202** | **3.202** |
| | | |
| *Bókað virði 31. desember 2018* | *4.952* | *4.952* |

ATLANTIC AIRWAYS

**9. Materiell støðisogn (Kr 1.000)**

| | Konsern | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **2019** | **Flogfør og viðlíkahald** | **Eykalutir** | **Rakstrar gøgn** | **Hangarur bygningar og grundøki** | **Tilsamans** |
| Útveganarvirði primo | 708.309 | 3.354 | 38.894 | 45.577 | 796.134 |
| Tilgongd í árinum | 10.804 | 0 | 8.049 | 0 | 18.853 |
| Frágongd í árinum | -6.678 | 0 | -1.751 | 0 | -8.429 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | **712.435** | **3.354** | **45.192** | **45.577** | **806.557** |
| | | | | | |
| Uppskrivingar primo | 0 | 0 | 0 | 2.000 | 2.000 |
| Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Uppskrivingar 31. desember** | **0** | **0** | **0** | **2.000** | **2.000** |
| | | | | | |
| Av- og niðurskrivingar primo | -184.888 | -1.425 | -20.586 | -21.148 | -228.047 |
| Avskrivingar í árinum | -46.411 | -239 | -3.980 | -1.961 | -52.591 |
| Av- og niðurskrivingar viðv. frágongd í árinum | 2.226 | 0 | 1.135 | 0 | 3.361 |
| **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-229.073** | **-1.664** | **-23.431** | **-23.109** | **-277.277** |
| | | | | | |
| **Bókað virði 31. desember 2019** | **483.362** | **1.689** | **21.761** | **24.468** | **531.280** |
| | | | | | |
| *Bókað virði 31. desember 2018* | *523.421* | *1.929* | *18.308* | *26.429* | *570.087* |

| (Kr 1.000) | Atlantic Airways | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **2019** | **Flogfør og viðlíkahald** | **Eykalutir** | **Rakstrar gøgn** | **Hangarur bygningar og grundøki** | **Tilsamans** |
| Útveganarvirði primo | 708.309 | 3.354 | 38.894 | 45.577 | 796.134 |
| Tilgongd í árinum | 10.804 | 0 | 4.849 | 0 | 15.652 |
| Frágongd í árinum | -6.678 | 0 | -1.751 | 0 | -8.429 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | **712.435** | **3.354** | **41.991** | **45.577** | **803.357** |
| | | | | | |
| Uppskrivingar primo | 0 | 0 | 0 | 2.000 | 2.000 |
| Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Uppskrivingar 31. desember** | **0** | **0** | **0** | **2.000** | **2.000** |
| | | | | | |
| Av- og niðurskrivingar primo | -184.888 | -1.425 | -20.586 | -21.148 | -228.047 |
| Avskrivingar í árinum | -46.411 | -239 | -3.980 | -1.961 | -52.591 |
| Av- og niðurskrivingar viðv. frágongd í árinum | 2.226 | 0 | 1.135 | 0 | 3.361 |
| **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-229.073** | **-1.664** | **-23.431** | **-23.109** | **-277.277** |
| | | | | | |
| **Bókað virði 31. desember 2019** | **483.362** | **1.689** | **18.560** | **24.468** | **528.079** |
| | | | | | |
| *Bókað virði 31. desember 2018* | *523.421* | *1.929* | *18.308* | *26.429* | *570.087* |

## 10. Forútgjøld til keyp av flogførum

Forútgjøld í 2019 av flogførum í fíggjarstøðuni, er til keyp av tveimum Airbus A320neo flogførum, sum verða latin í 2023 og 2024.

| 11. Íløgur í atknýtt virkir (Kr. 1.000) | Atlantic Airways 2019 |
|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar | 25.000 |
| Tilgongd í árinum | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | **25.000** |
| | |
| Virðisbroytingar 1. januar | 0 |
| Partur av úrsliti sambært ársrokskapi | -323 |
| Virðisbroytingar í árinum | 0 |
| **Virðisbroytingar 31. desember** | **-323** |
| | |
| **Bókað virði 31. desember 2019** | **24.677** |
| | |
| *Bókað virði 31. desember 2018* | *25.000* |

**Kapitalpartar í atknýttum virkjum sundurgreina seg soleiðis:**

| Navn | Heimstaður | Ognar-partur | Eginogn | Netto úrslit |
|---|---|---|---|---|
| Hotel Atlantic P/F | Sørvágur | 100% | 24.677 | -323 |

ATLANTIC AIRWAYS

| 12. Íløgur í assoceraðum virkjum (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Atlantic Airways 2019 |
|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar | 4.995 | 1.795 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | **4.995** | **1.795** |
| | | |
| Virðisbroytingar 1. januar | 9.645 | 9.645 |
| Partur av úrsliti sambært seinasta ársrokskapi | 8.904 | 8.904 |
| Virðisbroytingar í árinum | -7.000 | -7.000 |
| **Virðisbroytingar 31. desember** | **11.548** | **11.548** |
| | | |
| **Bókað virði 31. desember 2019** | **16.543** | **13.343** |
| | | |
| *Bókað virði 31. desember 2018* | *14.640* | *11.440* |

**Kapitalpartar í associeraðum virkjum sundurgreina seg soleiðis:**

Konsern

| Navn | Heimstaður | Ognar-partur | Eginogn* | Netto úrslit* |
|---|---|---|---|---|
| Duty Free P/F | Sørvágur | 50% | 22.468 | 16.925 |
| Green Gate Incomming P/F | Tórshavn | 49% | 2.388 | 847 |
| Ognarfelagið matr.nr. 1332e P/F | Tórshavn | 40% | 8.000 | 0 |
| Gjáargarður P/F | Gjógv | 31% | 3.078 | 85 |

** Sambært seinasta ársroknskapi*

Atlantic Airways

| Navn | Heimstaður | Ognar-partur | Eginogn* | Netto úrslit* |
|---|---|---|---|---|
| Duty Free P/F | Sørvágur | 50% | 22.468 | 16.925 |
| Green Gate Incomming P/F | Tórshavn | 49% | 2.388 | 847 |
| Gjáargarður P/F | Gjógv | 31% | 3.078 | 85 |

** Sambært seinasta ársroknskapi*

| 13. Onnur virðisbrøv (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Atlantic Airways 2019 |
|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar | 1.242 | 1.242 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | -29 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | **1.242** | **1.242** |
| | | |
| Virðisbroytingar 1. januar | -1.000 | -1.000 |
| Partur av úrsliti sambært seinasta ársrokskapi | 0 | 0 |
| Virðisbroytingar í árinum | 0 | 0 |
| **Virðisbroytingar 31. desember** | **-1.000** | **-1.000** |
| | | |
| **Bókað virði 31. desember 2019** | **242** | **242** |
| | | |
| *Bókað virði 31. desember 2018* | 242 | 242 |

| 14. Tíðaravmarkingar (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Konsern 2018 | Atlantic Airways 2019 | Atlantic Airways 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Forútgoldin hølisleiga | 106 | 84 | 106 | 84 |
| Aðrar tíðaravmarkingar | 1.503 | 1.797 | 1.503 | 810 |
| **Tíðaravmarkingar tilsamans** | **1.608** | **1.881** | **1.608** | **895** |

| 15. Onnur áogn (Kr. 1.000) | Konsern 2019 | Konsern 2018 | Atlantic Airways 2019 | Atlantic Airways 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Depositum | 13.133 | 12.609 | 13.133 | 12.609 |
| Onnur áogn | 8.439 | 1.458 | 7.593 | 1.458 |
| **Onnur áogn tilsamans** | **21.572** | **14.067** | **20.726** | **14.067** |

| 16. Avleidd fíggjarlig amboð (Kr. 1.000) | Konsern | | | |
|---|---|---|---|---|
| | 2019 | 2019 | 2018 | 2018 |
| | Ogn | Skyldur | Ogn | Skyldur |
| Framtíðar gjaldoyraavtalur | 0 | 166 | 809 | 0 |
| Swap flytingar (brennievni) | 3.461 | 0 | 0 | 8.532 |
| **Avleidd fíggjarlig amboð tilsamans** | **3.461** | **166** | **809** | **5.532** |

| | Atlantic Airways | | | |
|---|---|---|---|---|
| | 2019 | 2019 | 2018 | 2018 |
| | Ogn | Skyldur | Ogn | Skyldur |
| Framtíðar gjaldoyraavtalur | 0 | 166 | 809 | 0 |
| Swap flytingar (brennievni) | 3.461 | 0 | 0 | 8.532 |
| **Avleidd fíggjarlig amboð tilsamans** | **3.461** | **166** | **809** | **8.532** |

ATLANTIC AIRWAYS

### 17. Áogn

Øll áogn, hjá konsern og móðurfelag, fellur til gjaldingar innan 1 ár.

| | Konsern | | Atlantic Airways | |
|---|---|---|---|---|
| **18. Forútgjøld og tíðaravmarkingar (Kr. 1.000)** | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** |
| Forútgjøld, ferðaseðlar | 42.231 | 40.538 | 42.231 | 40.538 |
| Avsett frítíðarløn | 6.235 | 5.527 | 6.235 | 5.527 |
| Tíðaravmarkingar | 17.213 | 21.756 | 17.213 | 21.756 |
| **Forútgjøld og tíðaravmarkingar tilsamans** | **65.679** | **67.821** | **65.679** | **67.821** |

| **19. Langfreistað skuld (DKK 1.000)** | Konsern | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Skuld 31. des. 2019** | **At gjalda innan 1 ár** | **At gjalda aftaná 5 árum** | **Skuld 31. des. 2018** |
| Veðlán | 375.839 | 31.096 | 200.169 | 406.590 |
| **Langfreista skuld tilsamans** | **375.839** | **31.096** | **200.169** | **406.590** |

| | Atlantic Airways | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Skuld 31. des. 2019** | **At gjalda innan 1 ár** | **At gjalda aftaná 5 árum** | **Skuld 31. des. 2018** |
| Veðlán | 375.839 | 31.096 | 200.169 | 406.590 |
| **Langfreista skuld tilsamans** | **375.839** | **31.096** | **200.169** | **406.590** |

Langfreistaða skuldin tilsamans er íróknað rentu swap.

Felagið hevur hildið sínar láni- og rentuskyldur gjøgnum árið.

## 20. Veðsetingar og møguligar skyldur v.m.

### Móðurfelag

Flogfør og tyrlur við einum bókaðum virði pr. 31. desember 2019 á 483 mió. kr. eru veðsett fyri 711 mió kr.

Felagið hevur tveir leasing sáttmálar. Hesir viðv. tveimum A320neo flogførum.

Leasingskyldurnar eru hesar:
Í 2020: 38,3 mió. kr.
Aftaná 5 ár: 134,5 mió kr.

Felagið borgar fyri skuld hjá assoseraðum felag áljóðandi 12 mió kr., til í seinasta lagi 2021.

Felagið hevur tryggjað lángevarum hjá assoseraðum felag, at rakstur og gjaldføri hjá dótturfelag eru nøktandi til at halda virksemið hjá dótturfelagi gangandi í 5 ár frá tí degi, at leigusáttmáli hjá dótturfelag við assoseraðum felag er galdandi.

Av tøkum peningi er 2,5 mió kr. veðsettar

Felagið leigar hølir til umsiting frá Vága Floghavn í nýggja terminal bygninginum.
Leigusáttmálin kann ikki sigast upp fyrr enn í 2022. Árliga leigugjaldið er 0,8 mió kr.

Felagið hevur gjørt avtalu við Airbus verksmiðjuna, um keyp av tveimum A320 neo flogførum. Tað fyrra verður latið í 2023, og tað seinna í 2024.

### Konsern

P/F Hotel Atlantic hevur gjørt sáttmála um at leiga bygning í Havn frá P/F Ognarfelagið matr.nr. 1332e. Leigusáttmálin kann uppsigast við skrivligari fráboðan á 24 mánaðir, tó í fyrsta lagið 20 ár eftir, at sáttmálin kemur í gildið, sum er í 2020.

### 21. Nærskildir partar

| Avgerandi ávirkan: | Grundarlag fyri ávirkan |
|---|---|
| Fíggjarmálaráðið, Tinganes, 100 Tórshavn | Høvuðspartaeigari |

**Týðandi ávirkan:**

Felagið hevur í 2019 veitt tyrlutænastu til Fíggjarmálaráðið fyri 14,3 mió. kr. (2018: 14,3 mió. kr.) og til Fiskimálaráðið fyri 30,1 mió. kr. (2018: 30,1 mió. kr.). Felagið hevur ikki veitt lán ella veðhald, kautión ella ábyrgd fyri høvuðspartaeigara.

Samhandil fer fram millum keypara og seljara í armslongdarhandli.

Felagið hevur ikki havt samhandil við, veitt lán ella veðhald, kautión ella ábyrgd fyri nevnd, stjórn ella við fyritøkur uttan fyri samtakið, har nevndu partar hava áhugamál.

| Atknýtt feløg | |
|---|---|
| P/F Hotel Atlantic | Sí notu 10 |
| P/F Duty Free | Sí notu 11 |
| P/F Green Gate Incoming | Sí notu 11 |
| P/F Gjáargarður | Sí notu 11 |
| P/F Ognarfelagið matr. nr. 1322e | Sí notu 11 |

Felagið hevur ikki havt samhandil av týdningi við associerað feløg.

Samhandil við associerað feløg fer fram millum keypara og seljara í armslongdarhandli.

## 22. Eginogn

**Partapeningur**
Partapeningur kr. 103.500.000 er lutaður sundur í 1.035.000 partabrøv á 100 kr. Partabrøvini eru ikki býtt í flokkar.

**Virðisjavnan av avleiddum fíggjarligum amboðum**
Virðisjavnan av avleiddum fíggjarligum amboðum inniheldur akkumulerað nettobroyting í dagsvirði av tryggingarflytingum, ið uppfylla treytirnar fyri trygging av framtíðar peningastreymum, og har tann tryggjaða flytingin enn ikki er realiserað.

**Tiltakspeningur av nettouppskrivingum eftir innanvirðisháttinum**
Órealiseraður vinningur og tap, ið stavar frá broytingum í marknaðarvirðinum av atknýttum feløgum verður innroknað undir tiltakspening av nettouppskrivingum eftir innanvirðisháttinum í eginognini.

**Flutt úrslit**
Flutt úrslit frá árinum og undanfarnum árum. Flutt úrslit er íroknað keyp av egnum partabrøvum fyri 69,4 mill.

**Tilmælt vinningsbýti**
Uppskot um vinningsbýti verður víst sum ein serstakur postur undir eginogn: Tilmælt vinningsbýti. Tá ið vinningsbýti er viðtikið á aðalfundi, verður avsett vinningsbýti innroknað sum skyldugt vinningsbýtið undir skuld.

## 23. Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

**24. Nýttur roknskaparháttur**

Atlantic Airways P/F (felagið) er eitt partafelag skrásett og heimahoyrandi í Føroyum. Bústaðurin hjá felagnum er Vága Floghavn, Sørvágur. Konsern- og ársroknskapur felagsins frá 1. januar til og við 31. desember 2019 er fyri felagið og lutin hjá felagnum í associeraðum feløgum. Atlantic Airways er eitt flogfelag, ið veitir tænastu innan ferðafólka- og fraktflutning, og er býtt í trý øki: rutuflúgving, leiguflúgving og tyrluflúgving. Hin 31. desember 2019 vóru trý flogfør í rakstri, og 184 starvsfólk knýtt at rutu- og leiguflúgvingini, sum hevur miðstøð í Vágum. Hin 31. desember 2018 vóru 2 tyrlur og 10 starvsfólk knýttar at tyrluflúgvingini, eisini við miðstøð í Vágum. Føroya Landsstýrið (Fíggjarmálaráðið) eigur 67% av partabrøvunum, 33% eru egin partabrøv.

**a. Upplýsing um samsvar**

Konsern- og ársfrásøgnin fyri Atlantic Airways P/F fyri tíðarskeiðið 1. januar til og við 31. desember 2019, er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki C stór.

Konsern- og ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

**b. Grundarlag fyri máting**

Konsern og ársfrásøgnin er grundað á søguligan kostnað, undantikið avleidd fíggjarlig amboð, sum verða víst til dagsvirði. Seinni í hesi notu verður greitt frá amboðunum at máta dagsvirðið.

**c. Gjaldoyra**

Roknskapurin er settur upp í donskum krónum (DKK), sum samstundis er funktionella gjaldoyrað hjá felagnum.

**d. Roknskaparligar metingar**

Uppsetan av konsern- og ársfrásøgn í samsvari við ársroknskaparlógina krevur, at leiðslan ger roknskaparligar metingar, ið ávirka nýttan roknskaparhátt og innroknað aktiv, passiv, inntøkur og útreiðslur. Veruliga úrslitið kann víkja frá hesum metingum.

Roknskaparligar metingar verða støðugt endurmettar. Broytingar av roknskaparligum metingum eru innroknaðar í tíðarskeiðið, tá broytingin er gjørd, og eftirfylgjandi tíðarskeið, sum verða ávirkað.

Felagið metir ikki at vandin er stórur fyri at roknskaparligu metingarnar, sum eru nýttar til hesa ársfrásøgn, vilja ávirka týðandi, tey mettu virðini av ogn og skuld, innanfyri næsta roknskaparár.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Konsernrokskapurin

Konsernroknskapurin fevnir um móðurfelagið Atlantic Airways og atknýtt feløg, har Atlantic Airways beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættindunum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan. Fyritøkur, har konsernin eigur millum 20% og 50% av atkvøðurættindunum og hevur týðandi, men ikki avgerandi ávirkan, verða roknaðar sum assosieraðar fyritøkur.

Í konsolideringini verða allar konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, innanhýsis millumverandi og vinningsbýti eliminerað. Somuleiðis verður staðfestur og óstaðfestur vinningur og tap frá handlum millum konsolideraðu feløgini elimineraður.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða javnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum á nettoognum og skyldum hjá atknýttu feløgunum á útveganardegnum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva konsernini fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr konsernini, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### a. Fíggjarliga støðisogn

Kapitalpartar í atknýttum feløgum og assosieraðum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá felagnum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at hædd er tikin fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi, umframt frádrátti ella ískoyti av positivum ella negativum goodwill uppgjørt eftir yvirtøkuháttinum.

Atknýttar fyritøkur og assosieraðar fyritøkur við negativum roknskaparligum innara virði, verða innroknað uttan virði. Møgulig áogn hjá hesum feløgum verður niðurskrivað við lutfalsliga partinum hjá móðurfelagnum av tí negativa innara virðinum, í tann mun áognin verður mett at vera mist. Um roknskaparliga negativa innara virði er hægri enn áognin, verður restupphæddin innroknað undir avsettum skyldum í tann mun, móðurfelag hevur rættarliga ella ítøkiliga skyldu til at svara fyri negativu eginognini hjá hesum feløgum.

Keypt ella nýstovnað feløg verða í ársfrásøgnini innroknað frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða innroknað fram til avhendingardagin.

### b. Íløgur í assosierað feløg

#### (i) Kapitalpartar í assosieraðum feløgum

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá felagnum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at hædd er tikin fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi, umframt frádrátti ella ískoyti av positivum ella negativum goodwill uppgjørt eftir yvirtøkuháttinum.

Assosieraðar fyritøkur við negativum roknskaparligum innara virði, verða innroknað uttan virði. Møgulig áogn hjá hesum feløgum verður niðurskrivað við lutfalsliga partinum hjá móðurfelagnum av tí negativa innara virðinum, í tann mun áognin verður mett at vera mist. Um roknskaparliga negativa innara virði er hægri enn áognin, verður restupphæddin innroknað undir avsettum skyldum í tann mun, fyritøkan hevur rættarliga ella ítøkiliga skyldu til at svara fyri negativu eginognini hjá hesum feløgum.

Nettoopskrivning av kapitalparti í assosieraðum feløgum verður skrásett undir eginognini sum tiltakspeningur eftir innanvirðisháttinum, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið. Tiltaksgrunnurin verður javnaður við øðrum rørslum í eginognin í assosieraðum feløgum.

Keypt ella nýstovnað feløg verða í ársfrásøgnini innroknað frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða innroknað fram til avhendingardagin.

### c. Fremmant gjaldoyra

#### (i) Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

### d. Fíggjarlig amboð

Vanlig keyp og søla av fíggjarligum amboðum verða innroknað sjálvan handilsdagin. Handilsdagurin er dagurin, tá ið felagið bindur seg til at keypa ella selja aktivið.

#### (i) Ikki-avleidd fíggjarlig amboð

Tikið við í ikki-avleidd fíggjarlig amboð eru áognarar og innistandandi, vøruáognarar og onnur líknandi áogn, tøkur peningur, lán, vøruskuld og onnur skuld.

Ikki-avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsvirði, umframt, tá talan er um amboð, sum ikki verða innroknað til dagsvirði gjøgnum raksturin, tær útreiðslur, sum hava beinleiðis samband við flytingina. Aftaná upprunaligu innrokningina verða ikki-avleidd fíggjarlig amboð innroknað til amortiseraðan kostprís eftir effektiva rentuháttinum frádrigið niðurskrivingar.

Tøkur peningur og líknandi eru innistandandi uttan uppsøgn.

Seinni í hesi notu verður greitt frá innrokning av fíggjarinntøkum og -útreiðslum.

Øll onnur ikki-avleidd fíggjarliga amboð verða innroknað til amortiseraðan kostprís eftir effektiva rentuháttinum frádrigið niðurskrivingar.

#### (ii) Avleidd fíggjarlig amboð

Avleidd fíggjarlig amboð verða fyrstu ferð innroknað í fíggjarstøðuna til útveganarvirði og verða síðani virðisásett til dagsvirði. Positiv og negativ dagsvirði av avleiddu fíggjarligu amboðunum verða tikin við undir ávikavist ogn og skuld.

Broytingar í dagsvirðinum av avleiddu fíggjarligu amboðunum, ið eru ætlað til og lúka krøvini til tryggjan av dagsvirðinum av eini innroknaðari ogn ella skyldu, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin saman við møguligum broytingum í dagsvirðinum av tí tryggjaðu ognini ella skylduni.

Broytingar í dagsvirðinum av avleiddu fíggjarligu amboðunum, ið eru ætlað til og lúka krøvini til trygging av framtíðar ognum og skyldum, verða innroknaðar í áogn ella skuld og í eginognina.

Um framtíðartransaktiónin endar við innrokning av ogn ella skyldu, verða upphæddir, sum eru innroknaðar í eginognini, fluttar frá eginognini og verða innroknaðar í útveganarvirðið fyri ávíkavist ognina ella skylduna. Um framtíðartransaktiónin endar við inntøkum ella kostnaðum, verða upphæddir, sum eru innroknaðar í eginognini, fluttar til rakstrarroknskapin í tí tíðarskeiði, har tað tryggjaða ávirkar rakstrarroknskapin.

Fyri møgulig avleidd fíggjarlig amboð, ið ikki lúka krøvini fyri at verða viðgjørd sum tryggingaramboð, verða broytingar í dagsvirði innroknaðar so hvørt í rakstrarroknskapinum.

Broytingar í dagsvirðinum av avleiddum fíggjarligum amboðum, ið verða nýtt til trygging av nettoíløgum í sjálvstøðugum útlendskum atknýttum feløgum ella assosieraðum feløgum, verða innroknaðar beinleiðis í eginognina.

**Gjaldføristrygging**

Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina og flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

**Búskaparlig trygging**

Innrokning av trygging verður ikki gjørd viðvíkjandi avleiddum fíggjarligum amboðum, sum búskaparliga tryggjað ogn og skuld í fremmandum gjaldoyra. Broytingar í dagsprísi á slíkum avleiddum fíggjarligum amboðum verða innroknað sum vinningur ella tap í gjaldoyrabroytingum.

**Onnur ikki-handilslig avleidd fíggjarlig amboð**

Tá eitt avleitt fíggjarligt amboð ikki er ætlað til at handla ella til trygging, verða allar broytingar í dagsvirðinum beinanvegin innroknaðar í vinning ella tap.

**(iii) Virðisbrøv**

Vanlig keyp og søla av fíggjarligum amboðum verða innroknað sjálvan handilsdagin – ið er dagurin, tá ið felagið bindur seg til at keypa ella selja aktivið.

Virðisbrøv verða mátað til dagsvirðið svarandi til virðið á virðisbrævamarknaði fyri skrásett virðisbrøv og mett dagsvirði uppgjørt eftir viðurkendum virðisásetingarhættum fyri óskrásett virðisbrøv.

Onnur partabrøv eru partabrøv, har felagið eigur minni enn 20% av atkvøðunum í einum øðrum felag.

Virðisbrøv „tøk at selja“ eru ikki-avleidd fíggjarlig amboð, ið annaðhvørt standa undir hesum bólki, ella eru innroknað í ein av hinum bólkunum. Hesi er partur av støðisogn, um so er, at íløgan ikki er handlað, ella leiðslan ikki ætlar at avhendað aktivið innan 12 mánaðir eftir enda á roknskapartíðarskeiðið.

Broyting i dagsvirðinum á virðisbrøvum, ið verða roknað sum „tøk at selja“, verða innroknað undir fíggjarpostum.

**(iiii) Partapeningur**

**Vanlig partabrøv**

Vanlig partabrøv verða roknað sum eginogn. Stigvíst hækkandi kostnaðir beinleiðis í samband við útgávu av partabrøvum verða innroknaðir sum ein frádráttur í eginognini, frádrigið skattaávirkan.

**d. Støðisogn**

**(i) Innrokning og máting**

Støðisogn verður innroknað til útveganarvirði frádrigið akkumuleraðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Útveganarvirði inniheldur útreiðslur, sum hava beinleiðis samband við útveganina av ognini. Við í útvegnarvirðið av ognum, sum felagið sjálvt hevur framleitt, eru tilfarsútreiðslur, beinleiðis lønir og annar kostnaður av at fáa ognina í nýtiligan stand til ætlaða nýtslu, og kostnaður av at taka niður og burturbeina ognirnar frá tí staði, tær vóru í nýtslu. Innroknast sum kostnaður kann eisini flytingar frá eginogn av vinningi ella tapi frá gjaldoyratrygging viðvíkjandi keypi í fremmandum

gjaldoyra av støðisogn. Keyptur ritbúnaður, sum er neyðugur fyri, at støðisognin virkar, verður ognarførdur sum partur av ognini.

Tá partar av eini støðisogn hava ymiska livitíð, verða teir innroknaðir í støðisognina hvør fyri seg.

Vinningur og tap við frágongd av støðisogn verður staðfest við at samanbera søluvirði mótvegis bókað virði á støðisognini, og nettoupphæddin innroknað í „Onnur rakstrarinntøka“ í rakstrarroknskapinum.

**(ii) Flogfør, tyrlur, flogútgerð, hangarur, skrivstovur og bygningar**

Flogfør, tyrlur og flogútgerð, so sum motorar og eykalutir, verða innroknað til útveganarvirðið frádrigið akkumuleraðar av- og niðurskrivingar. Tá flogfør verða útvegað, verður útvegnarvirðið býtt millum sjálvt flogfarið og motorarnar. Flogfør verða avskrivað yvir ta mettu livitíðina, niður til scrapvirðið. Motorar verða avskrivaðir eftir flognýtslu. Tá ein motorur verður yvirhálaður, verður kostnaður av hesum ognarførdur, og eftirverandi kostnaður, um nakar er, av undanfarnu yvirháling, sum ikki er avskrivaður, verður útreiðsluførdur fult út.

**(iii) Eftirfylgjandi útreiðslur**

Kostnaðurin av at skifta út støðisogn verður innroknaður í bókaða virðið á støðisognini, um tað er sannlíkt, at framtíðar búskaparligi fyrimunurin av støðisognini vil koma felagnum tilgóðar, og at kostnaðurin av støðisognini kann mátast álítandi. Innrokningin av bókaða virðinum á útskifta lutinum heldur uppat. Allar aðrar útreiðslur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

**(iv) Avskriving**

Avskrivingar verða innroknaðar í rakstrarroknskapin liniert yvir mettu brúkstíðina fyri hvørja støðisogn. Metta livitíðin fyri inniverandi og samanberingar-tíðarskeiðið er:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Flogfør | 15–17 ár | 0 |
| Tyrlur | 17 ár | 0 |
| Eykalutir | 10–15 ár | 0 |
| Rakstrargøgn, innbúgv | 3–10 ár | 0 |
| Høvuðsviðlíkahaldsútreiðslur | 5–12 ár | 0 |
| Hangarur, bygningur og grundøki | 5–25 ár | 0 |

Mett verður um avskrivingarhættir, metta brúkstíð og scrapvirði, við hvørja roknskaparfrágreiðing.

Grundøki og jørð verða ikki avskrivað.

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

**e. Immateriel støðisogn**

**(i) Immateriel støðisogn**

Immateriel støðisogn verður innroknað til útveganarvirði frádrigið akkumuleraðar av- og niðurskrivingar. Avskrivingar verða innroknaðar í rakstrarroknskapin liniert yvir mettu brúkstíðina:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Ritbúnaður | 3–5 ár | 0 |
| Menningarútreiðslur | 3 ár | 0 |

Menningarútreiðslur fevna um útbúgving av flogskiparum og mekanikarum.

**(ii) Eftirfylgjandi útreiðslur**

Eftirfylgjandi útreiðslur verða bert ognarførdar, tá tær økja framtíðar búskaparligu nyttuna av støðisognini. Allar aðrar útreiðslur verða útreiðsluførdar, tá tær koma fyri.

**f. Leasaðar ognir**

Leasing sáttmálar, har treytirnar hjá útleigaranum flytur allan váða og fyrimunir við aktivinum til Atlantic Airways, er roknað sum finansiell leasing.

Øll onnur leasing verður roknað sum operationell. Operationelt leasaðu ognirnar eru ikki innroknaðar í javna felagsins.

**g. Goymslur**

Søluvøra og rakstarvøra verða innroknað til lægra virðið av kostvirði ella netto søluvirði. Kostvirðið á goymslum er grundað á „first-in first-out“ meginregluna, og inniheldur útreiðslur av útvegan og av at fáa goymsluna til høldar. Netto søluvirðið er tað metta søluvirðið í vanligum handli, frádrigið mettar útreiðslur av liðugtgerð og søluútreiðslur. Flogútgerð verður ognarførd eftir gjaldoyrakursinum keypsdagin.

**h. Vøru- og tænastuáogn**

Vøru- og tænastuáogn verður mátað sum upphæddir frá kundum í samband við sølu av vørum og tænastum sum partur av vanligum rakstri av fyritøkuni. Um gjalding er væntandi innan eitt ár, verður upphæddin klassifiserað sum ogn í umferð. Um gjalding er væntandi seinni enn eitt ár, verður upphæddin innroknað sum støðisogn.

Vøru- og tænastuáogn verður upprunaliga innroknað til dagsvirðið og aftaná innroknað til amortiseraðan kostprís eftir effektiva rentuháttinum frádrigið niðurskrivingar.

**i. Tøkur peningur**

Tøkur peningur er tað, sum felagið hevur í reiðum peningi, stuttfreistað innistandandi í peningastovnum upp til tríggja mánaða uppsøgn og kassakredittur. Kassakredittur er partur av lánum undir stuttfreistaðari skuld í fíggjarstøðuni.

**j.Virðisminkan**

**(i) Fíggjarlig støðisogn**

Fíggjarlig støðisogn verður mett hvønn fíggjarstøðudag fyri at gera av, um objektiv prógv eru fyri, at ognin er minkað í virði. Fíggjarlig støðisogn verður mett at hava verið fyri virðisminkan, um objektiv prógv benda á, at ein ella fleiri hendingar hava havt negativa ávirkan á metta framtíðar peningastreymin frá ognini.

Tap av virðisminkan av fíggjarligari støðisogn, innroknað til amortiseraðan kostnað, verður roknað sum munur millum bókað virði og nútíðarvirði av framtíðar-peningastreymunum, diskonterað við upprunaligu effektivu rentuni.

Týðandi fíggjarlig støðisogn verður mett hvør sær fyri virðisminkan. Restin av fíggjarligu støðisognini verður mett í bólkum eftir líknandi kredittváða. Øll tap stavandi frá virðisminkan verða innroknað í rakstarroknskapin.

Staðfest tap av virðisminkan verður afturført, um afturføringin objektivt kann tengjast til eina hending eftir at tapið varð staðfest. Viðvíkjandi fíggjarligari støðisogn, sum er innroknað til amortiseraðan kostprís, verður afturføringin innroknað í rakstarroknskapin.

Felagið metir hvønn fíggjarstøðudag fyri at gera av, um objektiv prógv eru fyri, at onnur partabrøv, tøk at selja, eru minkað í virði.

**(ii) Ikki-fíggjarlig støðisogn**

Bókað virði av felagsins ikki-fíggjarligu støðisogn, undantikið goymslur og útsettan skatt, verða mett hvønn roknskapardag fyri at gera av, hvørt tað eru ábendingar um virðisminking. Um slíkar ábendingar eru, so verður endurvinningarvirðið á ognini mett. Endurvinningarvirðið á immateriellari støðisogn við óásettari livitíð, ella sum enn ikki er tøk, verður mett hvønn fíggjarstøðudag.

Endurvinningarvirðið á eini ogn, ella peningastreymskapandi eind, er tað størra av hesum virðum, nýtsluvirðið og dagsvirðið frádrigið sølukostnað. Tá nýtsluvirðið skal metast, verða mettu framtíðar peningastreymarnir diskonteraðir til nútíðarvirðið við einum diskonteringssatsi eftir skatt, sum inniheldur verandi marknaðarmetingar av tíðarvirðinum av pengum og teir váðar, sum hoyra til ognina.

Tap av virðisminkan verður staðfest, um bókaða virðið av ognini ella peningastreymskapandi eindini er hægri enn endurvinningarvirðið. Tap av virðisminkan verða innroknað í rakstrarroknskapinum. Staðfest tap av virðisminkan viðvíkjandi peningastreymskapandi eindum verður fyrst nýtt at minka bókaða virðið av goodwill tengt at eindunum, og síðani lutfalsliga nýtt at minka um bókaða virðið av øðrum ognum í eindini (bólki av eindum).

Viðvíkjandi øðrum ognum, verða tap av virðisminkan frá undanfarnum tíðarskeiðum mett hvønn fíggjarstøðudag fyri ábendingar um, at tapið er minkað ella er burtur. Tap av virðisminkan verður afturført, um broytingar eru í teimum metingum, sum nýttar eru at staðfesta endurvinningarvirðið. Afturføring av tapi av virðisminking verður bert gjørd í tann mun, at bókaða virðið á ognini ikki er hægri enn tað bókaða virðið, sum hevði verið, frádrigið av- ella niðurskriving, um einki tap av virðisminking hevði verið staðfest.

**k. Avsetingar**

Avseting verður innroknað í felagsins fíggjarstøðu, tá felagið hevur løgfrøðiliga ella sambært siðvenju skyldu vegna farna hending, og tað er sannlíkt, at gjaldast skal fyri at lúka skylduna. Avsetingar verða ásettar við at diskontera framtíðar gjaldingar við einum diskonteringssatsi fyri skatt, sum inniheldur verandi marknaðarmetingar av tíðarvirðinum av pengum og teimum váðum, sum hoyra til skylduna.

**(i) Viðlíkahaldsskyldur av leasaðum flogførum**

Har felagið hevur bundið seg til, sambært leasing sáttmálum, at viðlíkahalda flogførini, verður avseting framd fyri skylduna, grundað á metta framtíðar kostnaðin av størri kabinu- og ávísum motorkanningum við at útreiðsluføra hóskandi upphæddir í rakstrarroknskapinum við støði í útrokning av flogtímum ella fráferðum og komum gjøgnum árið.

Avsetingar verða innroknaðar í javnan millum vøru- og aðra skuld.

**l. Forútgjaldingar**

Ónýttir seldir ferðaseðlar og aðrar forútgjaldingar verða innroknaðar sum forútgjaldingar í javnanum.

**m. Láni kostnaðir**
Generellir og serligir láni kostnaðir, bundnir at einum keypi, umbygging ella framleiðla av einum aktivi, sum er eitt aktiv, sum kann taka tíð til at fáa klárt til nýtslu, ella til at selja, eru kapitaliseraður saman við hesum aktivi, inntil hetta aktiv er klárt at taka í nýtslu, ella verður selt.

Fíggjarinntøkur vunnar av fyribils aktivinum, verða mótroknaðar láni kostnaðinum, sum er kapitaliseraður.

Allir aðrir láni kostnaðir verður útreiðsluførdir, tá ið teir koma fyri.

**n. Rakstarinntøkur**
**(i) Flutningsinntøkur**
Inntøkur frá sølu av ferðaseðlum verða ikki tiknar við, fyrr enn flutningurin er farin fram. Seldir ferðaseðlar, ið kunnu refunderast, men sum ikki eru brúktir innan tólv mánaðir roknað frá søludegnum, verða innroknaðir sum inntøka. Seldir ferðaseðlar, sum ikki kunnu refunderast, ið ikki eru brúktir, verða innroknaðir sum inntøka tveir mánaðir eftir ætlaðan flutning. Inntøkur frá post- og fraktflutningi verða innroknað í raksturin eftir, at veiting er farin fram. Nettosølan verður mátað uttan MVG og avsláttur.

**(ii) Leiga av flogførum og manning**
Inntøkur frá leigu av flogførum og flogmanningum verða innroknað í raksturin, tá ið tænastan er latin við endan av hvørjari leiguferð.

**(iii) Aðrar rakstrarinntøkur**
Inntøkur frá øðrum tænastum verða innroknaðar í raksturin, tá ið tænastan er veitt.

Aðrar rakstrarinntøkur umfata roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá felagnum, herímillum vinning og tap við sølu av immateriellari og materiellari støðisogn.

**o. Leasinggjøld**
**(i) Operativ leasinggjøld**
Gjøld í samband við operativa leasing verða innroknað í raksturin í tí tíðarskeiði, tey viðvíkja.

Leasingssáttmálarnir krevja at flogførini verða afturlatin, tá leasing tíðarskeiðið er útrunnið, í tráð við ásetingarnar í sáttmálanum. Fyri at lúka hesar treytir, skal felagið fremja viðlíkahald á hesum flogførum, bæði reguliga og tá sáttmálin endar. Avsetingar verða gjørdar, grundaðar á mettar kostnaðir fyri umvælingar og viðlíkahald.

**p. Fíggjarligar inntøkur og útreiðslur**
Sum fíggjarinntøkur verða innroknaðar rentuinntøkur, inntøkur frá vinningsbýti, kursjavningar frá virðisbrøvum, vinningur frá fremmandum gjaldoyra og tryggingaramboðum, ið verða innroknað í rakstrarroknskapin. Rentuinntøkur verða innroknaðar við teimum upphæddum, sum hoyra roknskaparárinum til. Inntøkur frá vinningsbýti verða innroknaðar í rakstrarroknskapin á degnum, tá ið rætturin til at móttaka vinningsbýti er staðfestur.

Fíggjarligar útreiðslur umfata rentur av lánum, avviklan av provisiónsavsláttri, tap av fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum aktivum og tapi av tryggingaramboðum, ið verða innroknað í rakstrarroknskapin.

Vinningur og tap av fremmandum gjaldoyra verða mátað á nettostøði.

Í rakstrarroknskapinum verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá  innroknaður, eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi, umframt frádrátt av avskrivingum av konserngoodwill.

Í rakstrarroknskapinum verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá  innroknaður, eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi, umframt frádrátt av avskrivingum av konserngoodwill.

**q. Skattur**
Skattur av úrslitinum fevnir bert um útsettan skatt. Inntøkuskattur verður innroknaður í rakstrarroknskapin undantikið tann part, ið stavar frá beinleiðis bókingum á eginognina, tá skattur eisini verður bókaður beinleiðis á eginognina.

Útsettur skattur verður innroknaður eftir fíggjarstøðuháttinum av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum milum roknskaparlig og skattlig virðir av aktivum og skyldum. Upphæddin, sum avsett verður til útsettan skatt, er grundað á tann væntaða realiseringsháttin ella gjalding av bókaðu virðinum á ognum og skyldum, við at nýta galdandi skattasatsir fíggjarstøðudagin.

Ein útsett skattaáogn verður innroknað í tann mun, at tað er sannlíkt, at framtíðar skattligur vinningur verður tøkur at nýta mótvegis tíðarbundnu mununum. Útsetta skattaáognin verður mett hvønn fíggjarstøðudag, og verður minkað í tann mun, tað ikki longur er sannlíkt at skattaáognin verður realiserað.

**r. Virkisøkisfrágreiðing**
Eitt virkisøki (segment) er ein serskildur partur av felagnum, ið fæst við at veita vørur ella tænastur, og sum er undirlagt annan váða og ágóðar enn onnur virkisøki. Felagsins virkisøkisroknskapur er fyrst og fremst grundaður á rakstrarslag/øki. Virkisøkini verða ásett av leiðsluni og av, hvussu felagið ger internar frágreiðingar. Tær størstu inntøkukeldurnar hjá felagnum eru flogfara- og tyrluflotin. Vegna tað, at flogfør felagsins verða nýtt á ein smidligan hátt á rutunetinum, finst eingin álítandi háttur at býta hesar ognir og teirra atknýttu skyldur til landafrøðislig virkisøki.

Prísáseting millum virkisøkini er grundað á armslongdar meginregluna.

Úrslit, ogn og skuld fyri hvørt virkisøki innihalda teir postar, sum beinleiðis hoyra til økið, umframt teir postar, sum á rímiligan hátt kunnu býtast millum øki. Postar, ið ikki kunnu býtast á virkisøki, eru fyri tað mesta íløgur, og tær inntøkur, ið stava frá teimum, lán, og tær útreiðslur, ið hoyra til láni-ni, felagsognir og útreiðslur til høvuðsskrivstovu, og skatta-ágóðar og -skyldur.

Íløguútreiðsla innan virkisøkið er tann samlaði kostnaðurin gjøgnum tíðarskeiðið av at útvega fasta ogn, útgerð og maskinur, og óítøkiliga ogn aðra enn „goodwill“.

**Áseting av dagsvirði**
Fleiri av felagsins roknskaparhættum krevja, at dagsvirði á bæði fíggjarligum og ikki-fíggjarligum ognum og skyldum verður ásett. Dagsvirði eru ásett til mátingar og/ella kunningar grundað á fylgjandi hættir. Har sum tað er neyðugt, verður meiri greitt frá fortreytunum í ásetingini av dagsvirðinum í notunum til ávísu ognirnar ella skyldurnar.

**(i) Avleidd fíggjarlig amboð**
Dagsvirðið á gjaldoyratryggingum er grundað á marknaðarprísin, um hann er tøkur. Er eingin marknaðarprísur tøkur, verður dagsvirði mett við at diskontera munin millum framtíðarprísin sambært trygginini, og núverandi framtíðarprís fyri restupphæddina við at nýta ein váðafrían rentusats grundað á statsobligatiónir.

**(ii) Ikki-avleiddar fíggjarligar skyldur**
Dagsvirðið, sum er uppgjørt til kunningar, er roknað við støði í nútíðarvirðinum av framtíðar peningastreymum viðvíkjandi avdráttum og rentu, diskonterað við marknaðarrentuni fíggjarstøðudagin. Viðvíkjandi skuldarpartinum á konverterbarum obligatiónum verður marknaðarrentan ásett við at nýta líknandi skyldur, ið ikki kunnu konverterast.

**Virkisøkisroknskapur**
Virkisøkisroknskapur vísir virkisøkir felagsins. Virkisøkisroknskapurin avspeglar leiðslu- og internu rapporteringina hjá felagnum, og er býttur í tvey øki: Flogfara- og tyrlutænastu.

Prísáseting millum virkisøkini er grundað á armslongdar princippið.

Úrslitini fyri hvørt virkisøki innihalda teir postar, sum beinleiðis hoyra til økið, umframt teir postar, sum á rímiligan hátt kunnu býtast millum øki.

**Flogfaratænastur**
Hetta virkisøki, sum umfatar rutu- og leiguflúgving, hevur miðstøð í Vágum, og rekur pr. 31. desember 2019 3 flogfør við 184 starvsfólkum.

**Tyrlutænasta**
Innan hetta virkisøki vóru pr. 31. desember 2019 2 tyrlur í rakstri við 10 starvsfólkum. Miðstøð er í Vágum.

**Lyklatøl**
Lyklatøl eru roknað út eftir tilmælum frá Den Danske Finansanalytikerforening.

**Kapitalfrágreiðing**
Kapitalfrágreiðingin er uppsett eftir óbeinleiðis háttinum, ið vísir gjaldførið frá rakstri, íløgum og fígging, umframt broytingar í gjaldføri í tíðarskeiðinum, og tøkan pening við byrjan og enda á tíðarskeiðinum.

Gjaldføri frá rakstri umfatar vinning/tap fyri tíðarskeiðið, regulerað fyri postar uttan gjaldførisávirkan, goldnan partafelagsskatt og broytingar í arbeiðskapitali.

Gjaldføri frá íløgum umfatar til- og frágongd av fastari ogn, útgerð og materiella støðisogn.

Gjaldføri frá fígging umfatar fígging frá og vinningsbýti til partaeigarar, og stovning og afturrindan av langtíðarlánum.

Tøkur peningur við byrjan og enda av tíðarskeiðinum umfatar reiðan pening og fíggjarliga umferðarogn uttan týðandi prísváða og sum lættliga kann býtast um við reiðan pening.

# 5.1 Allýsing

**ACMI**
Útleiga av flogfari við manning, men uttan beinleiðis útreiðslur í samband við flúgvingina, eitt nú oljuútreiðslur og avgreiðslur á flogvøllum.

**Flogtímar (airborne hours)**
Tímar á flogi.

**ASK: Útboð av tøkum seturkilometrum**
Tal av setrum til ferðafólk faldað við tal av flognum kilometrum.

**Flogtímar (block hours)**
Tíðin frá tí, at flogfarið fer av fráfaringarplássinum til flogfarið stendur á plássinum við komuhøllina.

**C-checks**
Størri fastlagdar viðlíkahaldsuppgávur.

**Current ratio (%)**
Ogn í umferð tilsamans við endan á tíðarskeiðnum dividerað við samlaðum stuttfreistaðum skyldum.

**EBT**
Úrslit áðrenn skatt.

**EBIT**
Úrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt.

**EBITDAR**
Úrslit av vanligum virksemi áðrenn fíggjarpostar, skatt, avskrivingar, amortiseringar og leasing útreiðslur.

**EBITDAR prosent**
Úrslit av vanligum virksemi áðrenn fíggjarpostar, skatt, avskrivingar, amortiseringar og leasing útreiðslur sum prosent av inntøkunum.

**EBITDA**
Úrslit av vanligum virksemi áðrenn fíggjarpostar, skatt, avskrivingar og amortiseringar.

**ETS**
CO2 kvotaskipanin hjá ES

**Great Circle Distance**
Tann styðsti avstandurin ímillum tvey punkt á jørðini máld í kilometrum

**Nýtsluprosent (load factor)**
Lutfallið millum ASK og RPK. Lýsir gagnnýtingina av flogfarakapasitetinum.

**Minima**
Operativa minima hjá flogvøllinum.

**Renting av eginogn (%)**
Úrslit eftir skatt í tíðarskeiðnum dividerað við miðal eginogini.

**Ognaravkast (%)**
Úrslit áðrenn fíggjarligar postar dividerað við aktivum tilsamans.

**RPK: Tal av seldum seturkilometrum**
Tal av seldum setrum til ferðafólk faldað við tal av flognum kilometrum.

**Seldir blokktímar**
ACMI/Charter flogtímar (leiguflúgving)

**Solvensprosent (%)**
Eginogn við endan á tíðarskeiði dividerað við samlaðum aktivum.

Hesi eru útroknað sambært tilmælum frá „Den Danske Finansanalytikerforening."



Mynd: Nicolás Vera-Ortiz




Mynd: Nicolás Vera-Ortiz